

# KJAKUPPRIT

## MIÐBÝARÆTLAN

TÓRSHAVN


EIN FRAMSÝNINGARGLUGGI FYRI FØROYSKA LIST OG MENTAN
INNBJÓÐANDI BÚSTAÐIR
EIN BARNAVINARLIGUR BÝUR
EIN BÝUR TIL ALLAR BORGARAR
LOKKANDI FERÐAMÁL
EIN TÆTTUR OG URBANUR BÝARKJARNI
NÝGGJAR MATUPPLIVINGAR
GRØNAR OASUR
SPENNANDI BÝARRÚM TIL UPPIHALD



LIST Í ALMENNA RÚMINUM
SAMANSETT OG NÝHUGSANDI BYGGILIST
BÝARHAVAR
DÁMLIGT HAVNALAG
VIRKIN BÝARRÚM
NÝGGIR MØGULEIKAR TIL SJÓÍTRÓTT
SØGULIGIR BYGNINGAR
ATGONGD TIL HAVNINA
NÝGGJ PLÁSS



## MIÐBÝURIN ER HJARTAÐ Í HAVNINI

Lívið í miðbýnum er fjølbroytt. Summi búgva her, onnur arbeiða her og uppaftur onnur koma higar í handilsørindum ella fara til tey mongu mentanarligu tilboðini. Øll eru vit við til at mynda býin og skapa lívið í honum.

Miðbýarætlanin er kommununnar uppskot til eina ætlan fyri henda býarpart. Vit stinga út í kortið yvirskipaðu hugsanirnar um okkara felags miðbý. Tørvur hevur verið á at síggja teir mongu møguleikarnar, og øll ynskini, sum býurin hevur. Tørvur hevur verið á eini ætlan, sum hyggur langt fram í tíðina. Í ætlanini eru eisini ítøkilig uppskot, sum menna og endurnýggja miðbýin – bæði bygningar, øki og vegir. Her eru smá tilboð í gerandisdegnum og stórar verkætlanir, sum verða framdar 10-15 ár frammi í tíðini. Miðbýarætlanin skal endurskoðast javnt og samt soleiðis, at mál og mið støðugt eru dagførd og hóska seg til nútíðina.

Miðbýarætlanin tryggjar góðar møguleikar at menna handilsvinnuna, útbúgvingarumhvørvið og ferðavinnu. Men fram um alt fara vit at menna ein livandi og fjølbroyttan miðbý við nógvum upplivingum til gagns fyri borgarar í øllum aldri.

Tórshavnar kommuna mennist skjótt, og tað ger høvuðsstaðurin eisini. Vit síggja alsamt broytingar fara fram, og soleiðis koma nýggir møguleikar til sjóndar. Í nógvum førum eru hetta møguleikar, sum ikki ber til at síggja frammanundan. Ein neyv miðbýarætlan, sum stýrir øllum viðurskiftum niður í smálutir, hevði tískil ikki verið skilagóð. Hon hevði altíð verið aftan fyri støðugu menningina í býnum. Til tess at tryggja menningina so nógv, sum til ber, hava vit evnað til eina yvirskipaða ætlan, sum bæði er eitt amboð til starvsfólkini í kommununi, men sum eisini verður vinnulívsfólkum og borgarum til íblástrar. Ætlanin ger okkum til reiðar at fanga møguleikarnar, tá ið møguleikarnir koma.

Miðbýarætlanin er vorðin til í samstarvi millum politikarar, umboð fyri handilslívið, vinnulívið, mentanarlívið, ferðavinnu og felagslívið í býnum. Men haraftrat eru nógvar eldsálir komnar við hugskotum og hava veitt teirra virðismikla ískoyti til orðaskiftið um okkara felags miðbý. Tilgongdin hevur verið spennandi og íblásandi. Og nógvir eru tankarnir, sum eisini eru at síggja í endaligu ætlanini.

At fremja allar verkætlanirnar í verki hendir bara, verður alt gjørt í góðum samstarvi. Borgarar, íleggjarar og kommunan mugu arbeiða í felag. Tí er tað okkara vón, at tað góða orðaskiftið, sum hevur verið um miðbýarætlanina, heldur fram, og at farið verður til arbeiðis soleiðis, at Havnin í framtíðini verður eitt enn meira dragandi stað at búgva, virka í og vitja.

Góðan lesihug

Vegna Býráðið

Heðin Mortensen
borgarstjóri

Tróndur Sigurðsson
formaður í Byggi- og býarskipanarnevndini

## MIÐBÝARÆTLAN - TÓRSHAVN

Miðbýarætlanin er evnað til várið 2016

Tórshavnar kommuna
Býarskipanardeildin
Postsmoga 32
110 Tórshavn
+298 302010
www.torshavn.fo

Stýrisbólkur
Mikael Viderø, Tórshavnar kommuna
Birita Wardum, Tórshavnar kommuna

Verkætlanarbólkur
Eyð Strøm, Tórshavnar kommuna
Emil Egerod Hubbard, Tórshavnar kommuna
Søren Yde Jensen, ZETA Architects

EIN SØGULIGUR BÝUR 9

FRAMTÍÐIN 17

TILGONGDIN 21

MIÐBÝURIN Í DAG 31

LARGE | AVBJÓÐINGAR OG MØGULEIKAR 39

LARGE | 6 ÁTAKSØKI FYRI MENNINGINA 49

MEDIUM | BÝARRÚM 83

SMALL | SAMSTARV OG FYRIBILS ÁTØK 99

VIRKISÆTLAN | ÁTØK Í MIÐBÝIN 105




# EIN SØGULIGUR BÝUR

TÓRSHAVN | SØGUGONGDIN

# TÓRSHAVN

Tórshavn varð fyrstu ferð nevnd á skrift í 1075 og verður tí mett at vera ein av elstu høvuðsstøðunum í Norðureuropa. Tær báðar vágirnar hvørjumegin nesið hava av fyrstan tíð gjørt Tórshavn til tingstað, trúarstað, fundarstað og handilspláss. Navnið Tórshavn vísir til upprunan.

Búseting og bygging í Havn vóru nær tengd at Føroya søgu og virkistreytunum í landinum. Millum einahandilin í Tinganesi og Húsagarð stóðu húsini trunkað saman, og her búðu bønarmenn við sínum húskjum, handverkarar, útróðrarmenn, soldátar, fólk, sum arbeiddu í handlinum, og embætismenn. Umstøðurnar broyttust munandi, tá einahandilin varð avtikin í 1856. Byggingin, ið var í Havnini fram til síðst í 1800, var hon, sum í dag verður kallað gamla Havnin. Íbúgvarnir gjørdust fleiri í tali, og ikki fyrr enn í 1880 varð skipað fyri teimum fyrstu útstykkingunum. Fyrst fram við Tinghúsvegnum, síðani við Vaktarhúsgøtu og Tróndargøtu. Amtið var tá byggimyndugleiki, ið ásetti vídd á grundstykkjunum, ið vóru heilt smá, 110-240 fermetrar til víddar. Lítið broyttist í fólkavøkstrinum fram til tað veruliga lopið, ið var í 50´unum. Í 1895 búðu 1600 fólk í Havnini, í 1926 búðu 2900 fólk, og í 1958 var talið 6500 fólk í Havnini.

Arbeiðstakarar í býnum settu sín dám á útsjónd og skap við byggingum, sum ikki í øllum førum vóru hepnar. Sum nakað nýtt í føroyskari byggisøgu vórðu í seinnu helvt av 1950-árunum raðhús bygd í eysturbýnum í framhaldi av líknandi bygging í vesturbýnum, sum nú fór at taka seg fram. Raðhúsini vóru eitt eyðkenni fyri býarmenningina, sum tey næstu áratíggjuni tók dik á seg inn í eina meira nútíðarkenda samfelagsskipan.

TÓRSHAVN 1796
FÓLKATAL: 550 FÓLK Í TÓRSHAVN




TÓRSHAVN 1895
FÓLKATAL: 1.600 FÓLK Í TÓRSHAVN




TÓRSHAVN 1926
FÓLKATAL: 2.900 FÓLK Í TÓRSHAVN



TÓRSHAVN 1958
FÓLKATAL: 6.500 FÓLK Í TÓRSHAVN



# MIÐBÝURIN

Ymiskir eru býarpartarnir í miðbýnum, og hava teir hvør sítt sereyðkenni, hóast teir liggja tætt upp at hvørjum øðrum og umskarast við hvønn annan.

Gamli býurin var fyri fólk til gongu, har var tætt bygt, og stutt var ímillum. Býurin hevur nú fingið bilteinar ímillum býarøkini. Vegaskipanin bindur økini saman við ringvegnum og ikki bara við vegum inn móti miðbýnum. Hetta er ein onnur mynd enn í gamla miðbýnum, har tað bar til av Restorffs kondittaríi at síggja, hvør kom og fór um Káta Hornið.

Umhvørvið í gamla býnum Úti á Reyni er sjáldsamt og serstakt, tí her er bygging við uppruna og dámi úr seinmiðøld, ein bygging, har fólk framvegis búgva og brúka húsini. Lívið millum húsaveggirnar hvørvur ytst úti í Tinganesi, har landsfyrisitingin heldur til um dagin, tí eftir arbeiðstíð er myrkt og tómt.

Havnar Kirkja, ið nú er Føroya dómkirkja, er í gamla partinum av Havnini, og hóast hon liggur goymd aftan fyri húsini undir Bryggjubakka, so sæst hon væl við sínum eyðkenda klokkutorni. Við síðuna av er H.N. Jacobsens Bókhandli, vanliga nevndur Gamli Bókhandil, ið liggur í einum av vakrastu urtagørðunum í Havn. Trøini við Mylnugøtu og uppi í miðbýnum við Eik Banka munnu hava sama aldur sum trøini við Gamla bókhandil. Hesi trøini í Mylnugøtu skapa ein sera hugnaligan dám við at tey leggja seg sum ein tekja yvir um vegin.

Í miðdeplinum av miðbýnum eru grótlaðaða Ráðhúsið og Løgtingshúsið, tann politiski pallurin. Á veg oman á Eystaruvág sæst niðan í Amtmansbrekkuna og embætisumhvørvið hjá danska ríkinum, tann hábærsliga amtmansborgin, Ríkisumboðshúsið í dag, og dómara- og fútahúsini við sínum vøkru urtagørðum. Hesir urtagarðar, eins og aðrir, liggja sum goymdar perlur í miðbýnum. Aftan fyri embætisumhvørvið er lítla umhvørvið undir Glaðsheyggi. Húsini standa tøtt, og hóast tey eru nakað ymisk í sniði við fleiri útbyggingum, so skapa tey saman við trøunum eitt vakurt umhvørvi, har útsýni er ymsastaðni út yvir býin og á høvdirnar vestanfyri.

Leiðin oman á Kongabrúnna, sum er staðarnavn frá fyrstu kongsvitjanini í 1874, ber dám av, at tann gamla Havnin dagar undan. Høgrumegin síggjast gomlu handilsgøturnar Bringsnagøta og Gongin, sum var høvuðsgøtan í gomlu Havnini. Aftan fyri Tryggingarfelagið er býlingurin undir Ryggi, ið er partur av gamla býnum, har upprunaliga smáhús og neyst vóru bygd. Húsini eru ymisk til støddar, og nýggir stórir bygningar, ið eru bygdir út ímóti havnarlagnum, eru við til at fjala tronga og hugnaliga býlingin, har fólk enn búgva og varðveita gamla byggisiðin. Fyri endan av Eystaruvág liggur Skansin, ein sonn náttúruperla í býarmyndini.

Um farið verður hinumegin nesið, so eru gomlu goymsluhúsini undir Bryggjubakka, ið við sínum takskjøldrum standa sum ein virðismikil framsíða móti havnarlagnum. Í Vágsbotni og Tórsgøtu verður skipað fyri fleiri mentanartiltøkum, ið hava við sær, at alt fleiri fólk savnast í umhvørvinum, ið er við at gerast hjartað í høvuðsstaðnum. Í dag verður Skálatrøð nýtt sum parkeringspláss, men her síggjast eisini søguligir bygningar, sum t.d. fyrsta verksmiðjan í landinum, fabrikkin hjá Öström, skeiva pakkhúsið hjá Lützen og Müllers Pakkhús. Við hesum nýliga umvældu bygningunum kann hugsast, at umhvørvið samanbundið saman við Tórsgøtu fer at gerast nýggi mentanarligi miðdepilin í býnum. Umhvørvið við Skipasmiðjuna og Vestaruvág stendur opið fyri nýggjum hugskotum og møguleikum.

Býlingurin í Bø og Rabarbukvarterið eru ein partur av tøttu og meira býarkendu byggingini í Havnini. Fleiri av gomlu húsunum í Bø eru broytt tey seinastu árini, men ímillum hesi hús síggjast framvegis tey smáu upprunaligu sethúsini. Húsini í Rabarbukvarterinum standa tætt saman og við fáum undantøkum heilt frammi í gøtulinjuni. Við stoyptum gørðum og úthúsum er bygt fast í hjá grannum. Markið millum alment og



privat er sostatt knívskorið, og er tað eitt eyðkenni fyri henda býarpartin. Harumframt er byggingin fjálg við smáum, hugnaligum urtagørðum ella útirúmum, og einstøk stór trø bróta ymsastaðni tað tætt bygda umhvørvið og geva økinum ein grønan dám.

Tinghúsvegurin hevur fingið navn eftir Tinghúsinum og er ein tann elsti vegurin í Havn. Niðari parturin av vegnum, sunnan fyri Bøkjarabrekku, sum varð skorin ígjøgnum góð 100 ár seinni, ber nógva ferðslu og liggur mest sum í myrkri av teimum stóru bygningunum vestan fyri vegin. Ovari parturin av Tinghúsvegnum er heilt øðrvísi, hann er smalur og bendir seg eftir lendinum. Urtagarðarnir eru girdir inni við stoyptum og rimaðum girðingum, og onkustaðni sæst vestureftir og oman yvir býin. Bøkjarabrekka er ein æðr í miðbýnum, har ferðslan til og frá miðbýnum møtist, umframt at bussmiðstøðin, Steinatún, liggur við endan av Bøkjarabrekku og savnar nógv fólk til gongu. Umhvørvið fram við Niels Finsens gøtu er eyðkent av muninum millum tey gomlu húsini á smáum grundstykkjum og teir stóru nýggju bygningarnar til handlar, bankar, skrivstovur o.a. Tað kann tykjast, sum stendur henda høvuðsgøtan í byggisniði og virksemi "á øðrum beininum" og veit ikki, hvønn fótin hon skal seta niðurat. Summi av teimum gomlu húsunum standa kanska bara og bíða eftir at verða tikin av nýggjum handilsbyggingum, og byggilistaliga er stórur ófriður í niðara parti av gøtuni.

Niðan ímóti viðarlundini er Sjónleikarhúsið. Hesi sermerktu reyðmálaðu húsini við svørtu tekjuni eru enn karmur um eitt ríkt mentanarlív. Kommunuskúlin hinumegin vegin stendur opin fyri nýggjum møguleikum, og fyri endan er handilsmiðstøðin SMS, ið savnar flest fólk við breiða úrvalinum av handlum.

Av Glaðsheyggi og Bøkjarabrekku hómast ein obeliskur á Gripsheyggi. Hesin obeliskur, Kongaminnið, er til minnis um fyrstu kongsvitjanina í 1874. Gott útsýni er frá Kongaminninum yvir býin, og umframt tey nevndu økini, so síggjast fleiri av teimum mongu bygningunum, ið geva býnum andlit.

*“Tann, sum er barnføddur í Havn, melur upp um gøturnar, heimkunnigur við lag og lyndi í teimum ymisku býlingunum í øllum tíðum á samdøgrinum. Allastaðni hevur lívið drigið sær gamalt spor og vunnið sær fast gongulag. Býurin hevur tað dæmið, sum eyðkennir pláss, har sum fólk hevur búð øld eftir øld. Tí Havnin er ikki ein lítil bráðkomin nýlingur sum mangar av hennara vøkru systrum norður í Atlantshavi. Tað er ein gamal býur, við sínum egna tóna, sínum egna andarúmi.“*

*“Tað var ein tíð, tá ið onkur var farin at ivast í, um Havnin fór at kunna standast sum høvuðsstaður í Føroyum. Tí ivast eingin í longur.“*

*Jørgen Frantz Jacobsen, “Tórshavn“ 1930*




FRAMTÍÐIN
TÓRSHAVN OG MIÐBÝURIN | NÝGGJ VISJÓN

# VISJÓN

*"Hjá honum, sum hevur sæð Havnina, man væl meiri hava rinið við, og myndin í huganum man vera væl persónligari. Havnin er, tað skerst ikki burtur, ein blíðlátin býur at koma til. Serliga tá ið komið verður eitt ljóst summarkvøld. Stigið verður á land á Kongabrúnni, sneitt um nøkur húsahorn, og so letur býurin seg upp, tú ert knappliga staddur mitt í honum. Í allar ættir er grønur gróður. Niðan ímillum urtagarðar, klettar og hús sker ein long spákingarleið við nógvum gongufólki. Hálvdoyvt ljóð av samrøðum teirra rennur út í sjóðið av ánni. Øll, sum hava verið í Havn, kenna tað: áin, sum rennur í skugganum av trøunum. Tað er sovorðin eyðkendur blíður dámur um henda gróðurgyrda Áarvegin. Eingin væntar sovorðið so norðarlaga og í hesum berliga landi."*

Soleiðis skrivar Jørgen Frantz Jacobsen í tíðargreinini "Tórshavn" frá 1930. Býarmyndin er ein onnur í dag, og miðbýurin ikki eins innbjóðandi við nógvum fólki og eini tutlandi á. Nei, heldur eru tað bilarnir, ið strúka framvið, ið mynda býarmyndina.

Fleiri málsetningar eru í visjónini hjá Býráðnum um at skapa trivna í býnum. Men býráðið vil hava meiri lív í miðbýin. Átakið skal síggjast aftur í miðbýnum, bæði í útsjónd og møguleikum, og býráðið er til reiðar at útvega karmarnar, so hvørt sum komið verður til átøkini. Men Rom varð ikki bygdur eftir einum degi, og tað verður tann nýggi miðbýurin heldur ikki.



Tórshavnar kommuna vil víðka um miðbýin, men varðveita upprunalig snið við atliti at bygging og landslagi, herímillum Tinganes og virksemið á havnarlagnum, so leingi tí er lív lagað. Somuleiðis ynskir kommunan at skapa møguleikar at byggja hægri og tættari og á tann hátt geva rúmd fyri spennandi arkitekturi í miðbýnum. Í Tórshavnar kommunu halda vit, at tað er umráðandi, at øll fáa høvi at vísa á eina gongda leið fyri miðbýin, sum øll eru felags um.

Havnin er og má vera lokomotivið í menningini, og tað er alneyðugt at gera nakað við miðbýin. Og hvat kunnu vit gera við tað, sum longu er gjørt? Møguleikarnir eru nógvir, og vit sita á einum gullnámi, uttan at vita tað. Tí skal sjálvandi farast eftir øllum hesum møguleikunum. Harumframt skal hugsast fram í tíðina og hyggjast meiri eftir, hvat tey ungu gera og vilja, tí tað eru tey, ið eru framtíðin. Um fólkið ikki er við til at mynda býin, so er einki grundarlag fyri trivnaði. Ein býur hevur sína samtíð og skal vera viðkomandi fyri teir borgarar, sum búgva har. Tað er brúk fyri arkitektunum, men eisini tí tilfeinginum, ið er í einstaka borgaranum.




POLITIKARAR
BORGARAR
BYGGIHARRAR



# TILGONGDIN

SAMAN UM MIÐBÝIN | VIÐLEIKARAR OG VERKSTOVUR

## TILGONGDIN

Miðbýarætlanin verður gjørd í fleiri stigum av einum verkætlanarbólki á býarskipanardeildini hjá Tórshavnar kommunu við Zeta Architects sum ráðgeva. Sum ráðgevi til verkætlanarbólkin er stýrisbólkurin, sum tekur sær av teimum yvirskipaðu avgerðunum í verkætlanini og loysnunum, ið hava verið til politiska viðgerð.

Í tilgongdini fram til í dag hava tríggir bólkar luttikið á ávikavist trimum verkstovum, ið allar hava havt sama evni til viðgerðar - nevniliga miðbýin. Men luttakararnir hava allir umboða ymiskar spurningar og ymiskt virksemi, soleiðis at miðbýurin varð sæddur frá fleiri sjónarhornum. Fyrsti bólkur fevndi um luttakandi arkitektarnar í arkitektakappingini um miðbýin, síðani vóru umboð frá ymsu deildunum í kommununi inni og umrøddu miðbýin, og at enda við vóru luttakarar, ið umboða tað fjølbroytta virksemi í miðbýnum. Eisini vóru Henriette Vamberg og Lærke Jul Gagner frá Jan Gehl Architects við til ta fyrstu verkstovuna og góvu íblástur til býarplanlegging, umframt at tær eisini luttóku á verkstovuna og komu við góðum íkasti til miðbýin.

Endamálið við verkstovunum var deils at greina tey neyðugu átøkini, sum skulu gerast í miðbýnum, deils at greina avbjóðingar og møguleikar, umframt at fáa fólk til at kenna ognarskap í endaligu miðbýarætlanini.

Ávegis í tilgongdini fram til í dag varð verkætlanin leypandi løgd fyri í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd til kunningar og møguligar avgerðir. Sum ein partur av politisku framløgunum vóru arkitektarnir Lene Krogh úr Horsens og Henrik Stjernholm úr Vejle og høvdu framløgur um býarplanlegging. Tey hava bæði hollar royndar innan býarplanlegging, og var vitjanin eisini við til at geva sera góðan íblástur til, hvussu kann arbeiðast við býarplanlegging í miðbýnum í Tórshavn. Henrik luttók eisini í seinastu verkstovuni, har hann millum annað gav teimum luttakandi íblástur til at gerast ein viðleikari í sambandi við menningina av miðbýnum.

Innkallingin av teimum ymisku bólkunum eins væl sum kunningin til tað politiska støði varð so vítt møgulig hildin sum verkstovur ístaðin fyri tær vanligu framløgurnar við spurningum. Endamálið við at arbeiða í verkstovum var at skapa eitt orðaskifti og at fáa ítøkilig íkast frá luttakarunum, heldur enn at halda eina passiva framløgu av einum úrskurði.

Í tráð við tilgondina verður ein borgarafundur í næstum, har borgarin eisini fær møguleika at siga sína hugsan, áðrenn miðbýarætlanin verður endaliga góðkend. Ætlanin er, at tilgongdin skal halda fram við einum orðaskifti, tá átøk og verkætlanir skulu gerast í mun til miðbýarætlanina.

SKIPANIN AV TILGONGDINI



## VERKSTOVA 1

Arkitektarnir, ið luttóku í arkitektakappinginium miðbýin, vórðu bodnir inn til fyrstu verkstovuna í sambandi við umrøðu av miðbýnum og býarmenningina av miðbýnum í framtíðini. Arkitektakappingin fevndi um bæði eina hugskotskapping og eina prosjektkapping um miðbýin. Uppskotini skuldu fevna um nógv ymisk evni, sum á ein ella annan hátt øll kundu geva eitt íkast til miðbýaræatlanina ella umrøðuna av miðbýnum, tí uppskotini vóru so ymisk og tó.

Arbeiðið í verkstovuni fór fram í minni bólkum, har ymisk evni og býarøki vóru umrødd við hugsanum um framtíðar menning. Hvørt evni varð sett í gongd við einari stuttari innleiðslu á ávikavist 3x5 min., har eitt umboð frá 1., 2. og 3. virðisløn í miðbýarkappingini fingu høvi stutt at leggja fram, hvussu teirra uppskot arbeiddi við ymsu evnunum, ið vóru sett á skrá. Hvørjar avbjóðingar og møguleikar sóu tey, og hvussu høvdu tey loyst hetta. Endamálið við stuttu framløgunum var at presentera hvørt evni fram og teir spurningar, ið leggja seg til hvørt evni, umframt at vísa á trý ymisk uppskot til loysnir sum íblástur og byrjan uppá arbeiðið í bólkunum.

Evnini vóru býtt upp í L, M og S, sum eisini er hátturin arbeitt verður við býarmenning í miðbýarætlanini. Men høvuðsspurningurin var, hvussu meiri lív fæst í miðbýin? Skjótt varð staðfest at hesin spurningur nemur við allar spurningar í L, M, S, tí ein góð loysn er treytað av samanspælinum millum hesar tríggjar partar, tí upp at stóru linjunum leggja býarrúmini seg, og lívið í býarrúmunum er treytað av viðleikarum og góðum loysnum og tiltøkum.

Hóast uppskotini vóru ymisk í sniði, so vóru nógv felagseyðkenni og eins hugsanir um okkara miðbý, og hvussu hann skal mennast í framtíðini. Til ber at lesa meira um hesar hugsanirnar í samanumtøkuni frá verkstovuni.



## VERKSTOVA 2

Kommunan hevur høvuðsleiklutin í mun til eina miðbýarætlan og tær verkætlanir, ið skulu fremjast í samsvar við framtíðar ætlanir um miðbýin. Hvussu kann t.d. miðbýarætlanin nýtast sum eitt innanhýsis amboð, tá kommunan er útinnandi organið? Og hvussu ber til at tryggja eitt smidligt samstarv millum øll arbeiðsøkini og deildirnar í kommununi?

Í næstu verkstovuni vóru innanhýsis fakfólk frá ymsu deildunum í kommununi innboðin til eina verkstovu. Starvsfólkini sita á ymsum arbeiðsøkjum, og skulu allar verkætlanir fylgjast í enda í annan - frá hugskotið til viðlíkahald.

Verkstovan fór fram í 6 bólkum við starvsfólkum frá øllum deildunum, men sum umboðaðu teirra økið innan trivnað, byggimál, mentan og tiltøk, infraskipan, umhvørvið og býarinnar útsjónd. Tveir tímar vóru settir av til hvønn bólkin, har einstøku evnini vóru viðgjørd út frá menningarmøguleikum og ítøkiligum avbjóðingum, ið kunnu verða við til at skapa ein betri miðbý. Hvør bólkur byrjaði við eini framløgu við Søren Yde Jensen frá Zeta Architects, rágevanum, ið leiddi luttakararnar inn í hví farið verður í holt við eina miðbýarætlan, og hvat ein miðbýarætlan inniheldur. Framløgan legði upp til eitt víðfevnt kjak innanfyri tey evnini, ið vóru sett á skrá.

Í bólkunum, har evnini trivnaður og mentan og tiltøk vóru umrødd, varð ásannað, at fleiri tilboð eru í miðbýnum, men at tey kanska ikki eru fjølbroytt og til allar aldursbólkar. Luttakararnir fingu við post-its lepum høvi at vísa á tey tilboð, ið eru í miðbýnum í dag, umframt hvørji tilboð eiga at vera í miðbýnum í framtíðini. Fleiri áhugaverd uppskot og hugsanir vóru sett á plakatir, sum kunnu verða íblástur til býarmenningina.

Leingi hevur verið tosað um at opna Havnará aftur í einum styttri strekki. Ein tílík verkætlan skal ígjøgnum fleiri tilgongdir og arbeiðsøki, og m.a. í bólkunum, har evnini umhvørvi og byggimál vóru umrødd, varð víst á, hvussu ein tílík tilgongd kann skipast, og hvat skal til fyri at kunna opna ánna. Kloakkviðurskiftini og reint vatn var ovast á breddanum í hesum sambandi, og í eini slíkari ætlan er eisini áhugavert at tosa um raðfestingar av arbeiðsgongdini, og hvussu deildirnar kunnu samstarva um ymisk viðurskifti tvørtur um eina verkætlan. Um áin fyrst verður reinsað, so er ikki óhugsandi, at Havnará aftur fera at tutla oman eftir Áarvegnum.

Hugsanirnar í sambandi við ymisku evnini vóru fjølbroytt og til tíðir nýhugsandi, ið samstundis eru gott íkast til at fáa meiri lív í býin og at skapa ein betri miðbý.

Les meira hesar hugsanirnar og framtíðar tilboð til borgararnar í samanumtøkuni frá verkstovuni.


VAKSIN
30-65 ár
Öström
Lestrarhús
Tjóðpallur
sommer
Í DAG
Í FRAMTÍÐINI

## VERKSTOVA 3

Miðvísa ætlanin fyri miðbýin hevur m.a. til endamáls at skipa miðbýin í høvuðsstaðnum til tann tørv og ynskir, ið eru frá m.a. ferðavinnuni, handilslívinum, vinnulívinum og stovnum, eins og ein miðbý, ið livir upp til krøvini í okkara samtíð, men ikki minst ein miðbý til tey sum búgva og virka har.

Í triðju verkstovuni vóru ymiskir lyklapersónar, ið umboða ymisk áhugamál í miðbýnum innboðin til eina verkstovu. Hóast luttakararnir umboðaðu ymisk áhugamál, so høvdu tey øll tað til felags, at júst teirra virksemi er við til at mynda miðbýin í dag - bæði gerandislívið og frítíðarlívið allar dagar í vikuni og alt árið runt.

Verkstovan fór fram í 6 bólkum við umboðum frá ferðavinnuni, havnaøkinum, kafé- og náttarlívinum, mentanini, ítróttinum og handilslívinum. Hálvur annar tími var settur av til hvønn bólkin, ið allir byrjaðu við eini framløgu frá Henrik Stjernholm, sum vísti á, hvussu eitt samstarv millum t.d. handilslív og menning av miðbýnum í Vejle hevur havt góð úrslit við sær. Framløgan var góður íblástur til eitt livandi kjak um, hvussu teirra virksemi kann gerast ein partur av framtíðar menningini av miðbýnum.

Ynskini og hugsanirnar til okkara miðbý og eitt framtíðar samstarv í sambandi við menningina av miðbýnum vóru sera fjølbroytt, men tað varð eisini ásannað, at tað ikki bert er kommunan, ið skal menna miðbýin. Allir partarnir eru viðleikarar í mun til at skapa meiri lív í býin.  Til ber at lesa meira um hesi ynski og hugsanir í samanumtøkuni frá verkstovuni.



*Framløga við arkitekti Henrik Stjernholm úr Vejle*





# MIÐBÝURIN Í DAG

FJØLBROYTTUR BYGNAÐUR | EITT SERSTAKT ÚTGANGSSTØÐI

## HVAR ER MIÐBÝURIN - AVMARKAN

Miðbýurin er miðdepil í Tórshavn, og miðdepil í Føroyum. Men hvar er miðbýurin í roynd og veru?

Fyri mong er miðbýurin Vaglið, Tinganes, Vágsbotnur og økið kring Steinatún, men miðbýurin er so mangt annað.

Í miðbýarætlanini er miðbýurin avmarkaður sum tað reyða økið, víst á kortinum. Eitt øki, sum spennir frá Vestaru- og Eystaru bryggju og líka niðan í viðarlundina. Har eru nógvar av týdningarmiklu funktiónunum, sum eru við til at definera lívið í miðbýnum. SMS, Nonnuskúlin, Kvøldskúlin, og Tinghúsvegur eru sostatt eisini partur av miðbýnum.

Nógv síggja kanska ikki SMS sum part av miðbýnum - tað er ov langt burturi. Tað sama við Skansanum ella Nonnuskúlanum. Men tað eru týdningarmiklar funktiónur, sum hava stóra ávirkan á lívið í miðbýnum, og í veruleikanum eru tær ikki so langt burturi. Størsti parturin av tí, sum í miðbýarætlanini verður definerað sum miðbýur, liggur innan fyri 500 metrar frá Vaglinum. Miðbýurin í Tórshavn er ein kompaktur miðdepil við mongum attraktivum funktiónum við stuttari frástøðu. 500 metrar svara til einar 5-6 min. til gongu hjá teimum flestu, sostatt tekur tað ikki meir enn 5 min. at ganga til tað mesta í miðbýnum.

Afturat øllum týdningarmiklum og attraktivum funktiónum, sum eru partur av miðbýnum, hevur miðbýurin í Havn eina rúgvu av fantastiskum grannum, sum liggja á markinum til sjálvan miðbýin.

Økið við Fróðskaparsetur Føroya (campusøkið), viðarlundin og Gundadalur eru øki, sum nógv brúka dúgliga og hava tey tí stórt virði fyri miðbýin og skulu hugsast aktivt inn í framtíðar menningina í miðbýnum. Sambond frá miðbýnum út í tey attraktivu náttúru- og frítíðarøkini yviri við Strond, í Álakeri og Sandágerði, eru eisini virðismikil fyri miðbýin og kunnu styrkjast til gagns fyri framtíðina.


YVIR VIÐ STROND
FRUUTRØÐ
KONGAMINNI
GUNDADALUR
500 m
VIÐARLUNDIN
ÁLAKER
CAMPUSØKIÐ

## BÝARINNAR EYÐKENNI

Støðið undir miðbýarætlanini má vera innlivan og fatan fyri býnum sum er og síðani at menna teir partar, sum í dag eru við til at gera Havnina til nakað serstakt.

Tí tekur miðbýarætlanin støði í Tórshavn í dag og tekur skap við atliti at viðurskiftum í býnum og møguleikum, sum ein heildarætlan fyri miðbýin í framtíðini gevur.

Hyggja vit út yvir býin í dag, er landslagið samansett og fjølbroytt. Smá neyst og stórir vinnubygningar, gomul søgulig hús og nýggjur arkitekturur lið um lið, vinnulív og rekreatión, ymiskir litir og tilfar. Hesin stóri kompleksiteturin og blandingin av ymiskum funktiónum og brigdum, nýggjum og gomlum, aktiviteti og friði, litum og tilfari er nakað heilt serligt fyri Havnina og eitt megnar potentiali fyri býin. Tað er við til at gera býin til nakað serligt í dag og kann menna býin til nakað heilt einastandandi í framtíðini.

Hyggja vit at økinum Undir Glaðsheyggi, úti á Reyni, Rabarbukvarterinum ella Bøgøtu er eyðsæð, at Havnin hevur sín egna bygnað. Miðbýurin í Havn líkist ikki karrébýnum í Keypmannahavn ella boulevardbýnum í Barcelona.

Bygnaðurin í býnum við mongum fríttstandandi bygningum hevur uppruna í føroyskum byggisiði og hevur nakrar greiðar fyrimunir, tí nógvastaðni verða tún, sum geva góða lívd í tí mangan ólagaliga føroyska veðurlagnum.

Tann opni bygnaðurin gevur møguleikar at menna, byggja nakað tættari ella afturat, og tað sum er til avlops ber til at geva nýtt lív, endur nýggja ella taka burtur. Sostatt gevur hesin serligi býarstrukturin møguleikar fyri einum livandi og broytiligum býi.

Tann nýggja heildarætlanin fyri Tórshavnar miðbý byggir á visjónina um tann margfaldaða og samansetta býin. Taka vit støði í núverandi og heilt serligu samansetingini, strukturinum og teimum mongu menningarmøguleikunum, sum eru.

Framtíðarinnar miðbýur skal vera fyri øll, øll í Føroyum, bæði sosialt og í aldri. Tað er býurin, har fólk búgva, arbeiða, fara til handils og undirhald, íðka ítrótt ella bara njóta fríløturnar.

Visjónin fyri Tórshavnar kommunu i framtíðini og tað, vit halda kann gerast nakað heilt serligt er, at allir hesir ymiskleikarnir kunnu gagna hvør øðrum og ávirka hvønn annan. Í framtíðini skal fokus verða á at ymiskleikar í ymisku løgunum saman skapa eina synergieffekt, so 2+2 verður nógv meir enn 4, og menningin fer fram i sínamillum samanspæli.

Í framtíðini fara stórir bygningar og smáir at standa saman, gamlir og nýggir, handil og mentan, bústaðir og vinna, arbeiði og frítíð. Stór og aktiv býarrúm eins og smærri og róligari, og vit fáa ein bý, har allir føroyingar hittast uttan mun til aldur ella sosialt tilknýti.

Vit halda, at framtíðar miðbýur gerst best við at hugsa framvøkstur heldur enn kollveltandi broytingar. Vit halda, at vit heldur eiga at byggja á núverandi styrki og menningarmøguleikar heldur enn at byrja av nýggjum ella broyta bygnaðin í býnum radikalt.

Við framferðarháttinum framvøkstur heldur enn kollvelting síggja vit býarmenningina sum eina gongd, sum allatíðina fer fram meir og minni og á ymiskum stigum. Politisk og fíggjarlig viðurskifti broytast støðugt og við eini býarmenning, ið gongur yvir eini 10-20 ár, er tørvur á eini haldgóðari, men eisini smidligari menningarætlan.

Tað sum eyðkennir framvøkstur er, at hann fer fram bæði í smáum stigum og av og á í stórum lopum. Vit halda, at henda leið er tann rætta at ganga. Tí arbeiðir miðbýarætlanin við tí, vit kalla Large (masterplanlegging), Medium (býarrúmsplanlegging) og Small (miniplanlegging). Stórar, langtíðar verkætlanir (masterplanlegging) sum til dømis eitt nýtt mentanarhús við Skálatrøð, og smá tiltøk (miniplanlegging) t.d. fleiri beinkir í býnum, ella tiltøk. Bæði master – og miniplanlegging eru týdningarmikil amboð, tá talan er um at menna Havnina.


TANN SAMANSETTI OG FJØLBROYTTI BÝURIN


DÓMKIRKJAN - EITT BÝARMERKI


GERANDISLÍV - EITT LIVANDI VIRKSEMI


RÁÐHÚSIÐ - EITT HÁTÍÐARLIGT PLÁSS


BÚSTAÐIR - FØROYSKUR BYGGISIÐUR


URTAGARÐAR - FJALDU PERLURNAR Í BÝNUM


HANDILSLÍV


HAVNALAGIÐ - EITT LIVANDI VIRKSEMI


TANN SØGULIGI BÝURIN


MARGFELDNI OG TRIVNAÐUR


TINGHÚSIÐ - TANN POLITISKI PALLURIN


VÁGSBOTNUR - EIN MENTANARPALLUR

## AT ARBEIÐA VIÐ BÝARMENNING

At arbeiða við býarmenning er ein samansett uppgáva, sum umfatar nógv átaksøkir. Vanliga seta tey flestu býarætlanir í samband við ferðsluviðurskifti, parkering, kloakkviðurskifti og onnur stór infrastruktur-umráði. Hetta er eisini ein týðandi partur av eini býarætlan, men tað at skapa meir lív í miðbýin og ein betri miðbý fyri allar borgarar fevnir um nógv meira. Tí arbeiðir Tórshavnar miðbýarætlan við trimum yvirskipaðum stigum, sum tilsamans tryggja eina heildarorienteraða býarmenning.

Large
Large er langtíðar býarmenningin. Tað eru ætlanir, sum fevna um allan miðbýin og eru ofta tilgongdir/ verkætlanir, sum taka langa tíð at gjøgnumføra. Tað kunnu vera broytingar í ferðsluni, nýggj parkeringshús, men eisini ætlanir um, hvørjar funktiónir skulu vera í miðbýnum framyvir. Hvussu skal býtið vera millum skrivstovuvinnu, handlar og bústaðir? Skulu fleiri mentanarfunktiónir vera í miðbýnum, og hvussu við tungum ídnaði á havnarøkinum?

Large er harumframt stigið, har linjurnar - í stórum - fyri framtíðar miðbýin verða defineraðar. Her verður strukturin, sum miðbýurin skal mennast eftir, lagdur.

Øll tiltøk í medium og small skulu laga seg hareftir og stuðla uppundir. Eitt tiltak í medium kann ikki ganga ímóti large o.s.fr.

Medium
Medium er tað stigið, sum fevnir um konkret projekt í miðbýnum. Tað kann vera eitt nýtt spælipláss í Grasagarði, trappa í Vágsbotni ella nýggjar lestraríbúðir í Kommunuskúlanum. Tað eru ítøkilig prosjekt, sum fevna um eitt avmarkað umráði í miðbýnum, og sum taka eitt ár ella tvey at fremja. Tey projekt, sum í framtíðini verða framd í medium, taka øll støði í strukturinum og strategiini í Large og tí nýggju kósini, sum her er sett fyri miðbýin.

Small
Small er stigið, sum fevnir um teir smærru lutirnar í býnum. Tað kunnu vera nýggir beinkir í gongugøtuni, ein nýggj gøta við Frk. Cohr ella at lata Amtmansgarðin meira upp fyri almenninginum. Smá projekt, sum eru skjót at gera.

Small fevnir eisini um tiltøk í býnum, sum eru við til at fáa lív í um dagin og um kvøldið, vetur og summar. Tiltøk sum skoytubreytin, mentanarnáttin, konsertir og vónandi enn fleiri tiltøk í framtíðini.

Small kann eisini vera tiltøk, sum eru eina ávísa tíð. Smáar broytingar í býnum, sum eru eitt tíðarskeið og síðan verða tikin burtur aftur. Tað kann til dømis vera eitt býarrúm ella broyting í ferðsluviðurskiftunum, fyri at vita, hvussu hon riggar. Eitt dømi um hetta er at mála asfaltið í Tórsgøtu og soleiðis markera hana sum mentanargøtu. Tankin við hesum broytingum er at skapa kjak og eina livandi býarmenning, meðan vit bíða eftir teimum størru tiltøkunum í medium og large.


LARGE
L
Langtíðarmenning
Allur miðbýurin
Long tilgongd
MEDIUM
M
Ítøkiligt prosjekt
Partur av miðbýnum
Miðallong tilgongd
SMALL
S
Fyribils tiltak
Átaksøki í miðbýnum
Skjót tilgongd

L



# LARGE

MIÐBÝURIN | AVBJÓÐINGAR OG MØGULEIKAR

## AVBJÓÐINGAR

Grundarlagið undir menningini í framtíðar miðbýnum hevur verið at hyggja eftir, hvørjar avbjóðingar og møguleikar miðbýurin hevur í dag. Í samstarvi millum arkitektar, fakfólk hjá Kommununi og ymiskar borgarabólkar eru defineraðar 6 yvirskipaðar avbjóðingar, sum miðbýarætlanin má fyrihalda seg til.

Yvirskipað sæð hevur Tórshavnar miðbýur nógvar møguleikar, tann størsta avbjóðingin av hesum er, at teir í dag ikki koma til sín rætt.

Nógv av býarrúmunum eru ov vánalig, so fólk støðast ikki har, men fara bara ígjøgnum tey. Í sjálvum gøtunum eru bilarnir ráðandi, og ikki er nógv pláss til fótgangarar ella býarlív. Samstundis er netverkið í býnum ikki lætt at lesa av. At Dr. Jacobsensgøta er ein av mest týðandi handilsgøtum er til dømis ikki lætt at síggja og vita, hvørki hjá teimum, ið kenna býin, ei heldur hjá bygdafólki og ferðafólki. Tá tú fert niðan gjøgnum Niels Finsensgøtu og kemur niðan til Kommunuskúlan, kennist tað, sum miðbýurin steðgar her, sjálvt um tú bara ert fáar minuttir frá SMS.

Samstundis eru fleiri deyð øki í miðbýnum. Umráði, har antin er óspennandi at vera og fara ígjøgnum, og útvendar funktiónir eru ikki nógvar. Strekkið frá Skálatrøð til Vágsbotn kann virka drúgt, og umráðið við Vaglið ein vanligan gerandisdag kann virka tómt og ikki serliga livandi.

Størstu avbjóðingarnar í miðbýnum eru samlaðar í 6 yvirskriftir/diagramm, sum eru støði fyri víðari menning í miðbýnum.



Fleiri býarrúm eru ikki væl tilevnaði, og tí er góðskan eisini hareftir. Hesi býarrúm bjóða ikki inn til uppihald, og ganga fólk tí sum oftast bert ígjøgnum tey uttan at steðga á.



Torgið í Vágsbotni, har býurin og havnalagið møtast. Í dag ber torgið bráð av gjøgnumkoyrandi bilferðslu og parkeraðum bilum og er ikki serliga áhugavert at uppihalda sær í.



Býráðsplássið, ið burdi verið eitt hátíðarligt pláss, ber í dag bert bráð av parkeraðum bilum.



Býarlívið í Tórshavn er sera einstáttað, og fevnir nærum bert um handils- og cafélív. Miðbýurin í framtíðini eigur at rúma einum fjølbroyttum býarlívið til allar borgarar.



Hóast tað er stutt frá kommunuskúlanum og niðan til SMS, er torført at skilja hetta, tí tað kenst sum at miðbýurin steðgar her.



Handilsgøtan Dr. Jakobsensgøta er ein av høvuðsgøtunum í miðbýnum, men í dag er hetta ikki lætt at síggja og leggja til merkis í bygnaðinum í miðbýnum.



Afturlatnar framsíður fjala alt virksemi og lív, sum er inni í húsinum. Hesar framsíður geva ikki nógv til býarrúmini í dag, men kunnu tær gerast ein virkandi partur til livandi býarlív úti á gøtuni.




Tómu bygningarnir skapa deyðar plettar í miðbýnum og forða tí býarlívi, ið annars kundi verið á staðnum, sum somuleiðis kundi verið við til at skapað ein meiri livandi miðbý.



Bilarnir seta sín dám á smølu gøturnar í miðbýnum og gera tað torført hjá fólki til gongu at ferðast skjótt og lætt.



Bilarnir skulu vera í miðbýnum, men býarmyndin í framtíðini eigur at leggja størri dent á fólkið til gongu og ta uppliving hesi fáa, tá tey ganga ígjøgnum miðbýin.



Miðbýurin fevnir um fleiri áhugaverd øki, men hesi eru ofta skild sundur av deyðum plettum, har tað ikki er áhugavert at ganga ella har onki virksemi er út á gøtuna.



Hetta strekkið í Bøgøtu, sum ikki er serliga áhugavert, er við til at býta býin sundur og samstundis forðar tí fólkið til gongu at ferðast skjótt og lætt runt í býnum.

AVBJÓÐINGAR








NETVERKIÐ Í BÝNUM ER TORGREITT

Tær týdningarmestu gøturnar og sambondini eru torfør at fáa greiðu á, og tilsamans eru tær ein ógreiður strukturur, har torført er at navigera. Sjálv Gongugøtan er greitt markerað á einum stuttum strekki, men so skjótt tú fert av henni, verður meira fløkt. Týðandi strekki eru ógreið, og bjóða tær ikki víðari.

Kemur tú inn móti miðbýnum norðaneftir við Kommunuskúlan, kann leiðin tykjast óinnbjóðandi og ógreið, og ikki fyrr enn tú kemur í Steinatún kennist tað sum at vera í miðbýnum. At koma á Skálatrøð er ógreitt, hvør leið gongur til miðbýin. Stendur tú í miðbýnum, kennist tað ikki beinleiðis lokkandi at ganga oman móti sjóvarmálanum ella víðari út í ymsu rætningarnar í býnum.

Miðbýurin í Havn skal vera samanhangandi við spennandi gøtum, har tann livandi gerandisdagurin skal bjóða fólki frá økjunum rundanum inn í miðbýin. Fólk skulu kenna seg vælkomin, uttan mun til, hvaðani tey koma inn í miðbýin.

VÁNALIG BÝARRÚM

Hyggja vit at gøtum og økjum út frá einum kvalitativum sjónarhorni, er góðskan av býarrúmum í Havnini í nógvum førum vánalig. Býarrúmini eru ikki attraktiv, og tí hava tey ilt við at skapa lív í býnum og eru ikki innbjóðandi, tá ræður um at fáa fólk at støðast í býnum.

Pláss, torg, garðar og lundir eru vanliga býarrúm, har fólk hava møguleika at njóta fríløtur, men í Havn bjóðar stórt sæð einki av hesum inn til tað. Ynskja vit ein livandi bý, skal gonguumhvørvið vera gott. Gøtur skulu vera góðar hjá øllum í ferðsluni, og serligt atlit skulu vísast bleytu ferðsluni. Í Havn eru gøturnar góðar hjá bilum, men í flestu førum ikki serliga innbjóðandi fyri fólk til gongu, og nógvar av teimum eru keðiligar at ganga framvið.

Í MIÐBÝNUM RÁÐA BILARNIR

Forðingar í ferðsluni í Havn koma til sjóndar á ymiskum stigum. Í býnum sker Bøkjarabrekka miðbýin av og skilir norðara og syðra part sundur.

Á mestsum øllum vegum og býarrúmum í Havn eru bilarnir ráðandi, -koyrandi og parkeraðir bilar. Snið og brúk av ymisku plássunum og gøtunum lata bilin stýra. Hetta skapar bæði óattraktiv rúm, men eisini ferðsluliga vandamiklar støður hjá tí bleytu ferðsluni.

Ein stór avbjóðing liggur í at skapa betri javnvág millum ymisk ferðandi, bilar, súkklur og fólk til gongu. Sum nú er, er tann bleyta ferðslan mest kroyst, og eftirsum tey í bleytu ferðsluni eru treyt fyri einum livandi býi, er umráðandi at hesi fáa nógv meir pláss í býarrúmunum.







DEYÐ ØKI - STREKKI UTTAN BÝARLÍV

Í miðbýnum eru fleiri spennandi øki, men hesi eru ofta sundurskild av deyðum økjum og strekkjum, har býarlívið er avmarkað, har ongar útvendar funktiónir eru, og har keðiligt er at vera.

Tey deyðu økini eru við til at skilja býin sundur og forða fyri, at býarlívið og fólk til gongu flyta seg náttúrliga kring í býnum. Vaglið er gerandisdagar eitt gott dømi um eitt stórt hol mitt í býnum, har býarlívið steðgar, og fólk skulu fara um eitt óspennandi øki, har ongar funktiónir eru, ongir uppihaldsmøguleikar og upplivingar.

Tey deyðu økini eru viðvirkandi til, at frástøður í miðbýnum kennast stórar, sjálvt um tær í veruleikanum ikki eru tað. At fara fram við einum 200 metra longum óáhugaverdum strekki, kann kennast sum ein kilometur, og tað er ein trupulleiki í einum miðbýi, har veðrið mangan eisini kann vera avbjóðandi. Her er tað av týdningi, at frástøður til gongu ikki bara eru stuttar, men eisini kennast stuttar og áhugaverdar at flyta seg aftur og fram í.

STOVUHÆDD OG FRAMSÍÐA - INTROVERT

Nógvir bygningar í miðbýnum eru í dag rættiliga afturlatnir og introvertir. Tað ger, at tað lívið, sum fer fram inni í bygningunum, ikki sæst frá vegnum, og sostatt ikki er við til at skapa lív í býarrúmunum.

Samstundis gera tær afturlatnu framsíðurnar tað verri hjá handlum og aktivitetum í húsunum at koma út í gøturúmini og skapa lív, tá gott veður er, ella í sambandi við tiltøk.

Í sambandi við nýbygging og umbygging ræður um at hava fokus á at gera stovuhæddina opna við almennum og útvendum aktivitetum. Alt tað, sum miðbýurin hevur at bjóða í dag skal gerast meira sjónligt.

EINTÁTTAÐ BÝARLÍV

Miðbýurin í Havn hevur í dag dám av sera eintáttaðum býarlívi, sum fyrst og fremst byggir á handils- og matstovulív og minni á uttandura møguleikar til uppihald.

Framtíðarinnar miðbýur eigur í nógv størri mun at royna at greina sundur aktivitetsmøguleikar í býnum við atliti at døgninum, eftir veðurlagi og eftir árstíðunum. T.d, hvar í miðbýin kann eg fara í dag, um eg eri ung/ur og havi hug at vera aktiv/ur og íðka ítrótt?

Fleiri og nýggir aktivitetsmøguleikar skulu skapast í býnum, eisini aktivitetsmøguleikar, sum ikki eru bundnir at upp- og afturlatingartíðum. Samstundis skulu viðurskiftini betrast fyri býarlívi í vetrarhálvuni, tá veðrið er tann stóra avbjóðingin t. d býarrúmum við hálvtekjum og betri lívd.

# MØGULEIKAR

Framtíðarætlanin fyri miðbýar menningina tekur støði í royndum, har hugt hevur verið eftir, hvørjar avbjóðingar og møguleikar miðbýurin hevur í dag. Í samstarvi við arkitektar í býnum, fakfólk hjá kommununi og ymiskar borgarabólkar eru 6 yvirskipaðir møguleikar, sum miðbýarætlanin má taka atlit at.

Miðbýurin í Havn er longu í dag ein ótrúliga livandi staður við mongum vælvirkandi umráðum og funktiónum. Eina vanliga viku eru millum 200 og 300 tilboð/aktivitetir at fara til í býnum. Til dømis spennandi arkitekturur og søguligir bygningar og støð gera karmin um eitt margfalt býarlív.

Býurin hevur sostatt mangt jaligt at bjóða, tað eru stórir møguleikar, sum í framtíðini kunnu mennast til nakað heilt serligt.

Fyrst og fremst hevur miðbýurin góð býarrúm, sum liggja sum perlur á tráði oman gjøgnum miðbýin. Býarrúmini eru vegamót í býnum, sum liggja væl í strukturinum, men møguleikarnir sum livandi og attraktiv støð eru langt frá troyttir.

Somuleiðis eru høvuðsgøturnar í býnum (Tórsgøta, N. Finsensg. o.fl) týðandi æðrar í býnum, sum í dag ikki koma til sín rætt. Samstundis hava nógv víst á, at tær smáu tvørgangandi gøturnar og býarrúmini eru týdningarmikil partur av sálini í Havnini, tey eiga at varðveitast og styrkjast.

Grønu økini, havnin og sjógvurin og tær mongu søguligu slóðirnar geva somuleiðis stórar møguleikar, sum kunnu brúkast nógv betur í framtíðini. Eitt nú Amtmansgarðurin er eitt dømi um eina perlu, ið fá síggja ella fáa gagn av í dag. Harafturímóti er tað nýggja spæliplássið í Grasagarði eitt dømi um eitt grønt býarrúm, hvørs møguleikar nú verða væl brúktir við nýggja spæliplássinum.

Størstu møguleikarnir í miðbýnum eru samlaðir í 6 yvirskriftir, sum verða støðið undir víðari menning í miðbýnum.



Í miðbýnum sæst ein týðiligur bygnaður við høvuðsvegum, ið allir leiða ein oman til sjógvin og Tinganes. Á myndini sæst Tórsgøta, ein av týðiligu linjunum oman ímóti sjónum.



Frá nonnuskúlanum sæst heilt oman á sjógv. Her sæst Tróndargøta, somuleiðis ein av høvuðslinjunum í miðbýnum, men við sínum egna serliga eyðkenni.



Smølu gøturnar og skotini skapa ein serstakan innanhýsis bygnað í miðbýnum. Hesin bygnaður er somuleiðis eitt serligt eyðkenni fyri Tórshavn.



Við smærri átøkum ber til at styrkja tann eyðkenda innanhýsis bygnaðin í miðbýnum. Aftanfyri Reinsaríið er eitt gott dømi uppá eina smogu, ið bindur býin saman við smærri leiðum.



Grøna tilfeingið í miðbýnum er sera ríkt og fjølbroytt, og hevur Tórshavn stórt sæð altíð verið ein urtagarðsbýur.



Miðbýurin fevnir um fleiri grøn øki, har ímillum ein kirkjugarð, tey stóru vøkru trøini, fleiri fløtur, men ikki minst um teir privatu urtagarðarnar, ið liggja sum fjaldar perlur í miðbýnum.



Fleiri møguleikar eru við havnalagið í miðbýnum, bæði til at skapa nýtt virksemi, men eisini kann verandi virksemi víðkast. Hetta er við til at styrkja sambandið millum land og hav.



Maritimi ítrótturin er ein stórur partur av gerandislívinum hjá nógvum borgarum. Í framtíðini kundi hugsast at hetta virksemið gjørdist ein enn størri partur av býarmyndini.



Bilarnir mynda í dag býarrúmið á Vaglinum. Hetta býráðsplássið kann við smærri átøkum gerast eitt innbjóðandi og fjølbroyttari býarrúm.



Lítil býarrúm bjóða inn til eina øðrvísi uppliving enn tey størru býarrúmini, og verja tey ofta betri í mun til veður og vind.



Dómkirkjan og gomlu litríku húsini undir Bryggjubakka eru nakrir av bygningunum, ið mynda søguligu bygningarnar í miðbýnum.



Søguligu slóðirnar úti á Reyni siga frá søgum, og skulu hesar søgur varðveitast og styrkjast í mun til framtíðarplanlegging í miðbýnum.

## MØGULEIKAR







### VEGAMÓT - BÝARRÚM VIÐ POTENTIALI

Torg og pláss í Havn virka ikki optimalt í dag, men møguleikarnir eru stórir. Býarrúmini liggja spjadd í býnum, og tað letur upp fyri einum netverki av býarrúmum, sum bjóða til nógvar ymiskar aktivitetir.

Í sínum núverandi formi liggja býarrúmini ofta ótilrættisløgd, og fokus er á plássi fyri bilum, men í framtíðini fara tey at kunna bjóða fleiri fólkum at brúka býin. Býarrúmini kunnu stuðla upp undir størri fjølbroytni í býarlívinum og verða við til at skapa ein livandi bý alt døgnið og alt árið.

Mong av býarrúmunum kunnu betrast við lutfalsliga smáum inntrivum og gerast góð býarrúm, eftirsum tey liggja á røttum stað í býarnetverkinum. Tað "einasta", sum skal gerast er, at gera tey til attraktiv býarrúm, sum hóska til nútíðar og framtíðar tørvin og tann økta áhugan millum borgarar at brúka býarrúmini í býnum aktivt.

### SMALAR GØTUR OG SKOT

Havnin hevur eitt fínt net av smølum gøtum og skotum. Høvuðsgøturnar í býnum ganga oman gjøgnum býin úr útnyrðingi í landsynning og peika allar oman móti sjónum og Tinganesi. Ein greiður og lættskiljandi høvuðsstrukturur.

Tvørturum verða høvuðsgøturnar allan vegin knýttar saman við gøtum og smáum síðuvegum. Hetta er ein av serligu dygdunum við Havnini, sum hava stórar møguleikar við sær. Smáu síðugøturnar og rúmini, ið hartil hoyra, bjóða eina heilt aðra uppliving av býarrúmunum enn hinar gøturnar í netverkinum annars við gøtum og stórum býarrúmum sum býráðsplássið (Gamli kommunuskúlagarðurin) og Steinatún.

Tey trongu skotini og smáu býarrúmini kunnu gera eitt sekundert netverk í býnum við heilt serligum eyðkennum. Tað er nú einaferð so, at stórur partur av netverkinum annars verður stýrdur av at skula taka sær av nógvum infrastrukturellum og praktiskum atlitum, sum avmarka snið og dygd á rúminum. Tær smærru gøturnar hava hinvegin tann fyrimun, at tær kunnu hava nógv ymisk eyðkenni, har tað sansaliga og leikandi er í fokus. Smalar gøtur og skot kunnu geva nakað eyka og vera viðvirkandi til at gera Havnina til nakað enn meira serligt.

### 5 MIN. - LÍTIL FRÁSTØÐA HJÁ FÓLKI TIL GONGU

Miðbýurin í Havn er í dag í høvuðsheitum ein býur til bilar, men hevur stórar møguleikar við sær, sum ein býur til fólk til gongu, tí frástøðan er lítil samanborið við miðbýir aðrastaðni.

Í Havn liggja stórt sæð allar týdningarmiklar funktiónir innan fyri eitt øki, sum tekur 5 minuttir at ganga, og áhugaverdu økini sum liggja upp at miðbýnum, so sum havnarøkið, lestrarøkið við Fróðskaparsetrið og viðarlundin ber til at náa innan 5 minuttir.

Tann størsta avbjóðingin hjá fólki til gongu er bilferðslan, veðrið og tann veruleiki, at teir stuttu teinarnir kennast langir, tí teir eru keðiligir, óskipaðir og mangan ótryggir.

Góðir møguleikar eru at betra býin til fólk, sum eru til gongu, og nógvastaðni er ikki neyðugt við so stórum inntrivum.








## TÓRSHAVN GRØN OG BLÁ

Tórshavn hevur søguliga sæð frá gamlari tíð verið ein havnabýur við fríttstandandi húsum og smáum urtagørðum og marki ímillum. Tað sæst í býnum enn í dag. Miðbýurin er ríkaður við nógvum grønum økjum sum gørðum, kirkjugørðum og ikki minst privatum urtagørðum. Tey liggja í flestu førum væl í netverkinum í býnum, og stórir møguleikar eru í at hækka um rekreativu dygdirnar og fáa tey meira inn í býarlívið.
Trupulleikin í dag er, at nógv av teimum grønu økjunum eru ikki løgd til rættis til ávís endamál, og ofta eru tey torfør at koma til, avskorin frá býarrúmum og gøtum við múrum og hegni.

Havið og havnavirksemi er ein annar snúningsdepil. Í havnaøkjunum, og á sjónum eru stórir rekreativir møguleikar, og tað hevði verið til stóran vinning fyri býin, at styrkt sambandið millum miðbýin og hesi havnaøki.
Tey stóru havnaøkini á Eystaru- og Vestaru bryggju eru býarmenningarøki við stórum menningarmøguleikum, men eisini tann stóra havanaútbyggingin fer at hava stóra ávirkan á miðbýin og eigur at hugsast aktivt saman við býnum. Í nærmastu økjunum við bátabrýrnar eru eisini stórir møguleikar, sum í dag ikki verða brúktir heilt til fulnar. Virksemi, sum hoyra sjónum til t. d. róðving og kajakk v.m. gerast betur og betur dámdir, og eiga at hugsast við, tá talan er um at brúka havnina og sjógvin.

## TÓRSHAVN - SAMANSETTUR HØVUÐSSTAÐUR

Tórshavn er ein søguligur høvuðsstaður við týðiligum søguligum sporum. Hetta sæst aftur í serstøkum søguligum bygningum so sum kirkju, løgtingshúsi og Tinganesi, umframt søguligar gøtur við krókutum túnum og smølum skotum og trongum.

Tað hevði verið ein stórur fongur fyri býin, um betri samband varð gjørt til tað søguliga. Í flestu førum liggja hesi støð væl í netverkinum, og stórir møguleikar eru í at hækka um rekreativu dygdina og innarbeiða tey betur í býarlívið.

Komandi menningin í býnum eigur at virða og leggja áherðslu á hesi sermerktu søguligu støð, men eigur eisini at gera tey meira sjónlig og miðla tey betur. Skelting, upplýsing og søgufrásagnir í býarrúminum kunnu gera søguliga partin týðiligari og meira atkomiligan hjá øllum. Samstundis er umráðandi at tann søguligi, og tann fyri Tórshavn so serligi strukturin við krókutum gøtum, skotum og trongum, verður varðveittur, tá hildið verður fram við miðbýnum í framtíðini.

## KRAFTDEPLARNIR RUNDANUM

Tórshavn er í dag ein sterkur høvuðsstaður á nógvum økjum so sum í ítrótti, mentan og handli. Trupulleikin er, at nógvar av hesum fukntiónum eru uttan fyri miðbýin, antin í útjaðaranum á miðbýnum ella enn longri burturi.

Tí eru stórir møguleikar í at fáa núverandi kraftdeplar í býnum at koma við íkasti til lívið í miðbýnum. Miðbýurin skal í framtíðini hugsast sum ein miðbýarpallur, har býurin vísir allar sínar dygdir og tað, sum hann hevur at bjóða fram fyri ferðafólki, bygdafólki og borgarum.

Hetta kann hugsast inn í býarmenningina við at skapa betri karmar til ikki varandi virksemi, so sum pallar, tekjur ella við at breiða dúkar/tjald útyvir øki, ið eisini kunnu flytast inn o.s.fr. Í framtíðini skulu fornminnissavn, listasavn o.s.fr. kunna halda skiftandi framsýningar í miðbýnum. Fótbóltsfeløg skulu kunna hava kappingar í street-fótbólti í miðbýnum o.s.fr. Kraftdeplarnir, sum liggja uttan fyri miðbýin skulu kunna koma inn í miðbýin við teirra virksemi.

L



# LARGE

MENNING AV FRAMTÍÐAR MIÐBÝI | 6 ÁTAKSØKI

# 6 ÁTAKSØKI

Grundað á tær 6 størstu avbjóðingarnar og 6 teir størstu møguleikarnar í Tórshavnar miðbýi eru gjørd 6 átaksøki.

Tey ymisku átaksøkini eru har, sum Tórshavnar kommuna í framtíðini ætlar at gera átøk fyri at menna miðbýin. Við at hava fokus á hesi 6 umráðini, er ætlanin at tryggja, at menningin byggir á verandi møguleikar og at betra um, har sum tær størstu avbjóðingarnar eru.

Hesi 6 átaksøkini skapa í felag ein yvirskipaðan struktur í miðbýnum, sum øll tey átøkini, sum koma aftaná í medium og small taka støði í og stuðla undir. Samstundis eru tey amboð,sum tryggja, at nýggj prosjekt og hugskot, ið koma frá borgarum, politikarum og privatum íleggjarum í framtíðini kunnu rúmast í eini størri heild, soleiðis at tey eisini eru við til at menna yvirskipaða høvuðsstrukturin í miðbýnum.

Prosjekt og hugskot koma og fara. Summi verða til veruleika, onnur ikki, men við fokus á tey 6 átaksøkini fæst trygd fyri, at hildið verður fast við høvuðsstrukturin og kósina fyri framtíðar menning í miðbýnum.



SKAPA EIN EYÐSÆDDAN BYGNAÐ



BØT UM TEY REKREATIVU RÚMINI



SNILDARI BILFERÐSLA - BETRI VIÐURSKIFTI TIL FÓLKIÐ TIL GONGU



GAGNNÝT TAÐ BLÁA OG TAÐ GRØNA



BÚSTAÐIR AFTUR Í MIÐBÝIN



MIÐBÝURIN - EIN PALLUR FYRI HØVUÐSSTAÐIN

## SKAPA EIN EYÐSÆDDAN BYGNAÐ

Eitt, ið eyðkennir miðbýin í Havn er, at serliga 4 høvuðsgøtur eru. Tær ganga allar oman gjøgnum býin í ein útnyrðing-landsynning og allar leiða oman móti sjónum og havnini. Saman gera tær ein greiðan høvuðsstruktur. Tær fýra høvuðsgøturnar hava í dag ymisk úttrykk og ymiskar funktiónir í býnum.

Trupulleikin í dag er, at netverkið og ymisku samleikarnir ikki vísa funktiónirnar nóg týðiliga, tí er ikki lætt hjá fólki at finna vegin fram í býnum.

Í framtíðar miðbýi verður arbeitt við 3 samleikum fyri høvuðsgøturnar, hesir skulu styrkjast og mennast víðari, soleiðis at teir 3 samleikarnir eru lættir at skilja í býnum og stuðla undir tær funktiónir, ið liggja fram við gøtunum. Tað fer at styrkja samlaðu upplivingina av miðbýnum, um hvør samleiki sær verður mentur og skerpaður. Samstundis ger ein greið markering av teimum 3 samleikunum størri ymiskleika í gøtuupplivingarnar. Allar gøtur eiga ikki at vera eins, og til ber at uppstiga keðilig sambond við at arbeiða við at skapa nýggjar samleikar og leggja nýtt virksemi afturat, sum ikki hava verið í miðbýnum áður.

Samstundis hevur tað týdning at fáa netverkið breitt út, so tað fær fatur í lívið fram við havnini og gongur allan vegin niðan gjøgnum miðbýin, heilt niðan til SMS.


SJÓSAMBAND
SJÓSAMBAND
MIÐSTAÐARGØTA
MENTANARGØTA
MIÐBÝAR BÝLINGSVEGUR

## MIÐSTAÐARGØTA - STYRK SAMLEIKAN

Strekkið undir Pisuvarða niðan til SMS, Niels Finsensgøtu, Sverrisgøtu, Dr Jacobsensgøtu og oman eftir Vaglinum og Áarvegnum eru miðstaðargøtur. Miðstaðargøtur er miðdepils-strekkið. Her eru flestu handlarnir og innkeypsmøguleikar. Miðstaðargøtan og samleiki hennara er eyðkendur við tað, at fólk til gongu hava høga raðfesting. Áleggingin í býarrúminum er av ávísari góðsku sum t. d. granitt ella betongflísar og teknar um, at hetta er miðbýurin. Samstundis skulu tryggjast góðir møguleikar fyri útiservering og góðir møguleikar hjá handlum at flyta vørur útum, so sum útsøluvørur o.a. Býarrúm og øki hava fokus á møguleikan fyri torghandli og marknaðardøgum. Miðstaðarsamleikan kenna vit í dag frá gongugøtuni.



Møguleiki fyri uttandura handli, torgdøgum o.s.fr. eyðkennir miðstaðargøtuna.



Í miðstaðargøtuni eru góð viðurskifti hjá fólki til gongu. Samstundis hava handlar loyvi at ráða yvir einum parti av býarrúminum til uttandura borðeiðing, vørur o.a.



Samleikin í miðstaðargøtuni verður styrktur við at fáa samanhang í belegning, býarrúmsinnbúgv v.m. Gøtan hevur dygd í belegningum v.m. sum markera hana sum miðstaðargøtu og miðbý.

## MENTANARGØTA - STYRK SAMLEIKAN

Strekkið frá Sjónleikarhúsinum og Kommunuskúlanum oman eftir Tórsgøtu er mentanargøtan í miðbýnum. Tað ið eyðkennir mentanargøtuna er, at har eru nógv mentanartilboð, kaffistovur og matstovur. Samleikin hjá mentanargøtuni er eyðkendur við, at har er pláss fyri spæli og royndartiltøkum. Tað sæst í álegging, býarrúmsinnbúgvi o.ø. Tað nýggja spæliplássið í Grasagarði er eitt dømi um eitt býarrúm fram við mentanargøtuni, sum í tilfari og úttrykki stuðlar undir henda samleika. Býarrúm og øki fram við mentanargøtuni skulu hava møguleika at hava konsertir og tiltøk uttandura, soleiðis, at tær mongu mentanarfunktiónirnar kunnu fáa gagn av býarrúmunum. Nýggja glastakið yvir Perlutorgið er eitt dømi um eitt býarrúm fram við mentanargøtuni, sum stuðlar undir samleikan hjá gøtuni.



Í mentanargøtuni kann belegningurin vera litað asfalt, nýmótans gummiálegging o.s.fr. Her er eisini rúm fyri spæli og royndartiltøkum.



Býarrúmsinnbúgvið í mentanargøtuni er heilt ymiskt samanborið við miðstaðargøtuna og kann til dømis lýsa upp um kvøldið, vera litað ella í nýggjum og ótraditiónellum tilfari.



Í mentanargøtuni kann vera meira spæl í tí vanliga gøtuljósinum og kann tað t.d. vera litað ella skifta við árstíðunum. Tað litaða ljósið kann vera ískoyti til uttandurakonsertir o.s.fr.

## MIÐBÝAR BÝLINGSVEGUR - STYRK SAMLEIKAN

Tróndargøta og Tinghúsvegur eru sentralir býlingsvegir í miðbýnum. Eins og hinar høvuðsgøturnar hava tær greiða kós oman móti sjónum, men av øðrvísi slag. Her ræður gamli strukturin við smærri húsum við ymiskum fasadum í ymiskum litum. Í urtagørðunum eru stór og gomul trø, sum røkka út í gøturúmið og skapa eina grøna uppliving fyri tann vitjandi. Er ov rokaligt og ófriðaligt í miðstaðargøtuni og mentanargøtuni, kann ein leita sær eftir býlingsvegunum og njóta friðin oman gjøgnum miðbýin. Fyri nógvar borgarar og ferðafólk er tað har, ið tann serligi havnardámurin kann upplivast. Tí er umráðandi, at strukturin í býlingsgøtuni við sjálvstøðugum, fjølbroyttum húsum verður varðveittur sum grønir og friðarligir vegir oman gjøgnum miðbýin. Eitt alternativ til samleikan og upplivingina í mentanargøtuni og miðstaðargøtuni.



Tey stóru trøini í teimum gomlu urtagørðunum hava stóran týdning, tá hugsað verður um uppliving og samleika í gøtunum og tey eiga at varðveitast m.a. eisini við at eggja til at planta nýggj trø.



Gomlu húsasniðini og teir mongu litirnir skapa ein hugnaligan og serstakan samleika. Í umráðunum við býlingsvegirnar eiga ikki at verða bygdir stórir samanhangandi bygningar.



Samleikin hjá býlingsvegnum og upplivingarmøguleikar kunnu betrast við at skapa betri umstøður hjá fólki til gongu og møguleikar fyri at steðga á fram við vegunum.


MIÐSTAÐARGØTA


MENTANARGØTA


MIÐBÝAR BÝLINGSVEGUR

## VARÐVEIT TRONGAR OG SKOT

Umframt høvuðsgøturnar eyðkenna teir mongu snarvegirnir, trongar og skot miðbýin. Teir ganga gjøgnum býin tvørtur um høvuðsgøturnar. Trongar og skot eru týdningarmiklir partar av miðbýnum og eiga at varðveitast í framtíðini. Í teimum eru stórir møguleikar sum smá, hugnalig- og spennandi rúm og snarvegir ymsastaðni í býnum. Í framtíðini eiga hesi at verða gjørd meira sjónlig.



Teir mongu snarvegirnir í miðbýnum eru týðandi partur av upplivingini og gera at smidliga ber til at ferðast millum t.d. miðstaðargøtuna og mentanargøtuna ella til ein miðbýar býlingsveg.



Serlig markering í áleggingini kann vera við til at gera snarvegirnar sjónligari enn nú. Ofta eru hesir torførir at finna og er tað tí bert tey fáu, ið vita at teir eru har og ikki eru privat øki, ið fáa gleði av teimum.



Við ljósi ber til at gera snarvegirnar sjónligari og meira atkomiligar. Tá snarvegirnir eru stuttir, ber væl til at geva teimum hvør sín samleika, so teir gerast smáar, serstakar og hugaligar upplivingar.

## STYRK SEKUNDER BÝARRÚM

Fylgja vit teimum mongu smáu trongunum í býnum, verða vit ofta leidd til smá býarrúm, sum liggja millum høvuðsgøturnar, til dømis aftan fyri Guðrun og Guðrun ella aftan fyri Perluna. Hesi smáu býarrúmini hava heilt aðrar møguleikar enn tey stóru torgini sum Býráðsøkið og Steinatún. Teir dagar, tá nógvur vindur er í størru gøtunum, ber til at fara inn í tey smáu býarrúmini og leita sær lívd. Við at uppstiga býarrúmini, kunnu gerast smáar oasur og hugnalig støð, sum gera býin meira fjølbroyttan og skapa møguleikar, sum ikki finnast aðra staðni í býnum.



Rúmið aftanfyri Perluna er eitt dømi uppá eitt sekundert býarrúm, sum liggur í góðum sólargangi, og sum er uppstigað við sitplássum og nýggjum aktivum virksemi.



Í øðrum býum verða tey smáu, sekunderu býarrúmini brúkt til at skapa smáar ”lumma”-parkir ella ”lumma”-garðar. Oasur í tí ferðmikla býnum, sum geva lívd og tiltrongda hvíld.



Tá rúmini eru smá, hevði tað verið ein fyrimunur at givið teimum hvør sín samleika og kundu tey til dømis havt serstakan belegning o.s.fr.

## SKELTING Í MIÐBÝNUM

Høvuðsgøturnar, býarrúmini og teir mongu trongarnir gera, at óteljandi møguleikar eru at ferðast runt í býnum. Hetta er ein greiður fyrimunur, men ger eisini, at nógvir borgarar, ferðafólk, bygdafólk og onnur kunnu hava ilt við at finna rúnt. Miðbýarætlanin leggur tí upp til, at arbeitt verður við at gera ein skeltispolitikk, har mongu dygdirnar í miðbýnum verða gjørdar meira sjónligar og atkomiligar.




Smá skelti kundu víst fótgangarum betri runt í býnum og kundu samstundis víst, at t.d. SMS ikki var langt burturi, tá tú stóðst í Steinatúni - og øvugt!




Markørar á leiðini kunnu vísa, at ein er á rættari leið, og hvussu langt er eftir. Markørar, sum vísa, at hetta er eitt alment stað, kann eisini vera fyrimunur, tá nógv ferðafólk ivast, um t. d. Bojsensgarður er almennur.



Elektroniskir infoskermar á útvaldum støðum kunnu eisini vera við til at vísa, hvat hendir í býnum av tiltøkum o.s.fr.


GØTUR OG ONNUR BÝARRÚM
HØVUÐSBYGNAÐUR

## MENN TAÐ REKREATIVA RÚMIÐ

Í býarrúm í Tórshavn skal blásast nýtt lív. Gerast skulu attraktiv og rekreativ rúm. Tey flestu eiga at gerast um til fótgangararúm, men einstøk torg fara framvegis at hava ferðslu tvørturum. Helst skal talið av parkeringsplássum avmarkast á torgunum í býnum.

Tey rekreativu rúmini skulu vera tær glitrandi perlurnar í netverkinum, sum samla og styrkja upplivingar og virksemi, sum tey nýggju attraktivu sambondini leggja fram.

Torg, øki og garðar skulu bjóða inn til fjølbroytt brúk og bjóða ymiskt virksemi. Teir verða lagdir til rættis, so teir kveikja lív í býin alt samdøgrið, alla vikuna og alt árið.

Tey rekreativu rúmini skulu samlað sæð bjóða øllum brúkarum nakað. Summi halda ávís rúm vera meira lokkandi enn onnur, men nakað skal vera fyri øll. Býarrúm og garðar verða løgd soleiðis til rættis, at tey umboða eina breiða viftu av ymiskum virksemi. Hvørt einstakt býarrúm skal hava greiðan samleika, so tey markera seg í býarnetverkinum. Býarrúmini skulu hava eina góðsku, so tey megna at vera støð, har fólk ynskja at fara, tí har er gott at vera.

Samstundis skulu býarrúmini vera akkerspláss í netverkinum í býnum. Tey skulu vera attraktiónir, sum eru við til at toyggja netverkið í býnum og skapa samanhang frá SMS oman í Vágsbotn. Tí verður til dømis arbeitt við einum nýggjum býarrúmi við Kommunuskúlan, eini uppstigan av leiðini millum miðbýin og SMS og nýggjum býarrúmi við Østrøm og Skeiva pakkhús. Arbeitt verður við 4 yvirskipaðum sløgum av býarrúmum. Tey eru: urban býarrúm, grøn býarrúm, maritim býarrúm og eitt hátíðarligt býarrúm, Vaglið.



SMS TORGIÐ | INNGONGD TIL MIÐSTØÐ

Fyri at styrkja sambandið millum SMS og miðbýin verður eitt nýtt torg gjørt við SMS, har baksíðan verður vend til eina framsíðu og opnar upp móti miðbýnum.





KOMMUNUSKÚLAGARÐURIN | URBANUR ÍTRÓTTUR

Kommunuskúlagarðurin vendir sær til tey ungu í býnum og skapar sum nakað nýtt eitt urbant býarrúm í miðbýnum, har tað er møguligt at vera virkin og at íðka nýggjan ítrótt og ítriv.



GRASAGARÐUR | GRØNT SPÆLIPLÁSS

Grasagarður er stuttliga spæliplássið til yngstu borgararnar í býnum. Sum ein liður av mentanargøtuni verður dámur settur á litríkar litir og spæl.



FK TORGIÐ | SØLUTORG

Sum ein liður av miðstaðargøtuni verður torgið við FK uppstigað og fríðkað. Í framtíðini skal verða møguligt at hava uttandura handil og marknað við fyribils tekjum ella innilokan.



KIRKJUGARÐUR Á SVÍNARYGGI | SØGULIGT GRØNT ØKI

Kirkjugarðurin skal styrkjast sum eitt søguligt grønt býarrúm. Serligi dámurin í kirkjugarðinum skal varðveitast, men skelting í býarmyndini skal varpa meiri ljós á kirkjugarðin og søguna.




### BÝRÁÐSPLÁSSIÐ | HÁTÍÐARLIGT BÝARRÚM

Býráðsplássið er tað hátíðarliga plássið í Tórshavn. Býarrúmið verður gjørt sum ein partur av miðstaðargøtuni, har pláss skal vera til hátíðarlig tiltøk sum t.d. talur og fagnað av ítrótti, men somuleiðis skal pláss vera til t.d. street-hondbólt og onnur líknandi tiltøk.

### SKANSIN | SØGULIGT GRØNT ØKI

Skansin skal styrkjast sum eitt søguligt grønt býarrúm. Skelting v.m. skal varpa ljós á søguna, umframt at hann skal vera lætt atkomuligur.

### TINGHÚSVEGUR | MIÐBÝARLUND

Mongu vøkru urtagarðarnir fram við Tinghúsvegnum skulu gerast lættari atkomuligir og skapa eitt strekki - eina miðbýarlund.

### KONGABRÚGVIN | MARITIMUR ÍTRÓTTUR OG SPÆLIPLÁSS

Kongabrúgvin skal vera framtíðar miðdepil fyri maritiman ítrótt. Her ber til at skapa breytir og øki til kajakkir o.a. Samstundis er býarrúmið tað maritima spæliplássið, har dentur verður lagdur á vatn, segl o.a.

### STEINATÚN | FERÐSLUÆÐR Í MIÐBÝNUM

Steinatún er ferðsluæðrin í býnum. Alt økið skal skipast í mun til almennu ferðsluna, men samstundis skal Steinatún eisini vera inngongdin til býin, har eisini er møguleiki fyri uppihaldi.

### VÁGSBOTNUR | MARKNAÐARTORG, UTTANDURA BORÐREIÐING OG SPÆL

Vágsbotnur er ein sterkur miðdepil í miðbýnum, har fleiri funktiónir møtast. Torgið skal í framtíðini skapa betri møguleikar til uttandura borðreiðing, marknaðardagar og spæl.

## STYRKJA ÚRVALIÐ AV VIRKSEMI

Tað fer at styrkja miðbýin í Tórshavn at hava størri fjølbroytni í býarrúmsupplivingunum. Øll býarrúm skulu ikki líkjast, og til ber at hækka um góðskuna í keðiligu býarrúmunum við at arbeiða við at skapa nýggjan samleika og leggja nýtt virksemi inn og virksemi afturat, sum ikki hava verið í miðbýnum fyrr. Hetta letur upp fyri møguleikum at íðka ítrótt, eins og fyri rørslu, spæli og mentan sum partur av býarmyndini.



Ítróttarvirksemi skal í nógv størri mun hugsast inn í býarrúmið og vera við til at fáa ungar brúkarar inn í býin.



Miðbýurin skal vera ein sterkur handilsmiðdepil, og møguleikarnir fyri handilsvirksemi skal styrkjast.



Grøn øki í býnum skulu gerast meira atkomilig við ymiskum tiltøkum. Summi kunnu vera virkin grøn býarrúm sum spæliplássið í Grasagarði, og onnur kunnu vera meira still og friðsæl.

## PLÁSS FYRI GERANDISDEGI OG VEITSLU

Tá framtíðarinnar býarrúm skulu mennast, hevur tað týdning ikki einans at tryggja pláss til serlig tiltøk. Karmarnir til gerandislívið skulu eisini tryggjast og styrkjast til dømis við betri møguleikum fyri útiservering, uttandura handli o.s.fr.



Sølustøðini undir Bryggjubakka eru góð dømi um nakað, sum setir lív í gerandisdagin og ger tað møguligt hjá ymiskum fólkum at koma í býarrúmið.



Vágsbotnur er gott dømi um eitt býarrúm, sum verður brúkt til stór, serlig tiltøk. Verður torgið broytt í framtíðini, ræður um at tryggja, at møguleiki framhaldandi verður fyri stórum tiltøkum og betra møguleikarnar.



'Glaskuban' í gongugøtuni í Horsens er eitt dømi um eitt átak, sum gevur lív hvønn gerandisdag. Her kunnu allir býarborgarar hava tiltøk og 'kuban' er soleiðis eitt millumting millum gerandislív og tiltøk.

## GÓÐAR KARMAR BÆÐI SUMMAR OG VETUR

Veðrið og árstíðirnar eru ein avbjóðing í Føroyum. Tí hevur tað týdning, at tað ber til at broyta býarrúmini, so lív kann vera í bæði summar og vetur. Nøkur býarrúm verða meira virkin um summarið, og onnur leggja upp til vetrarvirksemi. Miðbýarætlanin inniheldur eina virkna ætlan um at skapa fleiri yvirdekkaði øki ymsa staðni í býnum við hálvtekjum og sum meira afturlatin býarrúm sum til dømis sum víst við húsinum í gongugøtuni (frammanfyri Løgtingshúsið). Teir nýggju møguleikarnir at yvirdekka og skapa lívd skulu vera við til at skapa meira lív í býin - alt árið.



Tann nýggja trappan í Vágsbotni er dømi um eitt býarrúm, sum skapar lív, tá veðrið er gott. Nýggj litstýrd ljós skulu vera við til at gera staðið spennandi um veturin, og streymur er innlagdur, so til ber at hava tiltøk har.



Árliga skoytubreytin er eitt dømi um vetrartiltak sum gevur býnum lív. Í framtíðini skulu hugsast meira vetrarvirksemi inn.



Tað nýggja takið við Reinsaríið er dømi um, at tað ber til at fáa betri umstøður til býarlív hóast veðrið kann vera ein avbjóðing. Í framtíðini skulu gevast fleiri av hesum møguleikunum.


KAFE VÁGSBOTN
ATLANTIC AIRWAYS
3

## SNILDARI BILFERÐSLA - BETRI VIÐURSKIFTI TIL FÓLKIÐ TIL GONGU

Bilurin ræður alt ov nógv í miðbýnum í dag og er ein stór orsøk til, at býarlívið ikki virkar nøktandi. Miðbýarætlanin arbeiðir við eini seyrgøtuloysn, fyri ein part tí henda loysnin er hon, sum gevur bestu ferðsluavgreiðslu í miðbýnum, og at henda loysnin skapar besta býarlívið í miðbýnum.

Bilurin skal eisini vera ein partur av býarlívinum og kann vera hentur, tá ræður um at uppliva fólk og býarlív, um hann á skilagóðan hátt verður væl innhugsaður. Býurin við ongum bilum vil ikki vera ein skilagóð loysn, als ikki í Føroyum, her veðurlagið setir serlig krøv og í stóran mun ávirkar flytiførleikan hjá fólki.

Í framtíðar miðbýnum er øll ferðsla vælkomin, men fólk til gongu hava avgerð og fyrsta rætt. Tað kennist og sæst beinleiðis aftur í ætlanini fyri, hvussu seyrgøturnar verða skipaðar í miðbýnum. Í seyrgøtunum verður ferðsluuppbýti við vegi til koyrandi og gongubreyt til gangandi upployst, og koyrandi og gangandi eru felags um rúmið - "shared space".


ATKOMUVEGUR
EINSRÆTTAÐ
SEYRUGØTA
RUNDKOYRING
VEGAMÓT VIÐ FERÐSLULJÓSI

## NÝTT HIERARKI – FÓLK TIL GONGU RÁÐA

Í framtíðar miðbýi er øll ferðsla vælkomin, men eitt nýtt hierarki skal skipast. Í seyrugøtunum hava fólk til gongu avgerðarrættin. Ferðsla við lastbilum og tyngri ferðslu skal út úr býnum, og ístaðin skulu súkklurnar raðfestast. Bilar eru framvegis vælkomnir, og hjá t.d. fólki við rørslutarni eru teir alneyðugir, men teir skulu koyra við lágari ferð og laga seg eftir fólki, sum er til gongu. Tá hetta verður gjørt á tryggan hátt, kunnu bilarnir gera sítt til, at býurin er ein livandi uppliving, samstundis sum løtt atgongd til parkering kann varðveitast. Parkeringin er av stórum týdningi fyri handilslívið í býnum.



**miðbýurin í dag**

Í dag ráða bilarnir í miðbýnum. Bleyta ferðslan ferðast millum bilarnar, og er hetta bæði ótrygt og ikki serliga innbjóðandi.



**miðbýurin í framtíðini**

Í framtíðini skal gerast rúm fyri bleytu ferðsluni í miðbýnum. Bilarnir skulu framvegis vera í miðbýnum, men skal fólki til gongu og á súkklu raðfestast.



Dømi uppá eina seyrugøta, har koyrandi ferðsla og fólki til gongu eru felags um rúmið - eitt shared space.

## SEYRUGØTUR - EIN LOYSN Í MIÐBÝNUM

Í seyrugøtunum verður ferðslan ikki býtt sundur við vegi til koyrandi og gongubreyt til fólki til gongu, men eru tey felags um rúmið - eitt sokallað ”shared space”. Fleiri av gøtunum í miðbýnum eru smalar og krókutar, har hús skjóta seg fram og aftur, tí er torført at býta gøturúmið upp við t.d. býarrúmsinnbúgvi í eina beina linju. Miðbýarætlanin arbeiðir tí heldur við rúmum, ið kunnu avmarkast á ymsar hættir við t.d. planting, uttandura borðreiðing, har tað ber til at steðga á eina løtu.



Broytiligu økini eru merkt øki í gøturúmunum, og kunnu tey nýtast til ein steðg, uttandura borðreiðing, planting, súkklu- og bilparkering v.m.



Í smáu gøtunum í tøttu býlingunum ferðast øll í einum felags rúmi. Vegurin er ikki avmerktur, og fólki til gongu hevur framíhjárættindi, meðan bilarnir koma í aðru røð.



Á vegunum við tvørgangandi ferðslu liggja tey avmarkaðu økini á einari linju, ið skapa ein samanhangandi og tryggan geira til bleytu ferðsluna.

## SÚKKLURNAR INN Í MIÐBÝIN

Súkklan er eitt flutningstól, sum er umhvørvisvinarligt, og situr tú á súkklu, so signalerar tú yvirskot og góða heilsu. Súkklan er á sama hátt sum almenna ferðslan fólkaræðislig, tó gevur súkklan einstaklinginum størri ávirkan á dagin og lívið. Súkklurnar gerast meiri og meiri sjónligar í býnum. Fólk eru farin at súkkla meiri, og tørvar okkum, at býurin innrættar seg til at taka ímóti hesum skjótt vaksandi flutningstóli. Ynskiligt er, at súkklan á sama hátt sum tann gangandi ferðslan verður raðfest í miðbýnum við økjum, sum eru egnaði til súkklur, býarrúmsinnbúgvi, sum ger tað møguligt at seta súkkluna frá sær o.s.fr. Karmarnir skulu gerast betri til súkklandi ferðsluna, soleiðis at vit fáa enn fleiri fólk á súkklu komandi árini. Súkklan sum flutningstól skal gerast ein sjálvsagdur partur av býarinnrættingini og sjálvsfatanini hjá havnar borgarum.



Í dag eru súkklurnar ikki hugsaðar inn í miðbýin. Tí verður eisini súkkla og parkerað har tað er pláss og sum best ber til.



Í framtíðini skal súkkluparkeringin hugsast inn í miðbýin, umframt at betrast skulu um viðurskiftini í sambandi við súkkluparkering.



Í dag eru el-súkklur í miðbýnum. Hesar skulu ikki bert nøkta tørvin hjá ferðafólki, men skulu tær eisini nýtast sum almennur flutningur hjá borgarunum.


NK 389

## UPPSTIGAN AV FERÐSLULJÓSUM

Sum liður í arbeiðinum at skapa smartari og meira tíðarhóskandi bilferðslu arbeiðir miðbýarætlanin við at betra viðurskiftini í Bøkjarabrekku, Steinatúni og Niels Winthersgøtu. Tað er týdningarmikið, at innkomuvegirnir til býin virka væl, og at lætt er at koma til og frá býnum.



Nýggja torgið við Steinatún skapar eina eyka vegabreyt, sum skal forða fyri bíðiraðum og bøta um viðurskiftini hjá bussunum.




Ein samankopling av ferðsluljósunum á innara ringvegi, soleiðis at ein bylgja av grønum ferðsluljósum fer sum frá líður at kunna forða fyri bíðiraðum í meldurtíðini.



Sum frá líður skulu nýggj ferðsluljós á krossinum Fríðrik Petersensgøta / Landavegur vera við til at betra atgongdina til nýggj parkeringshús í miðbýnum.

## BROYTINGAR Í EINVEGIS FERÐSLU

Ferðsluætlanin fyri miðbýin arbeiðir við, at sum frá líður, at gera fleiri øki við einvegis ferðslu. Einvegis ferðslan skal geva møguleikar fyri betri býarrúmum, lata upp fyri Havnará í einum stað og skal tryggja skilagóða ferðslu, tá nýggj parkeringshús koma í miðbýin.



Mylnugøta, sum í dag bindur eystur og vestur býin saman, skal gerast einsrættað fyri at tálma ferðsluni við trappuna og torgið í Vágsbotni.



Sum ein liður í at skapa eitt innbjóðandi strekki á Áarvegnum, har Havnará og grøni vøksturin skal gerast ein partur av nýggju býarmyndini verður Áarvegurin einsrættaður oman móti sjónum.



Sverrisgøta og Dr. Jakobsensgøta eru nevndar sum handilsgøtan í miðbýnum, og fyri at styrkja um hetta sambandið verða gøturnar einrættaðar.

## FRIÐ Í TÝDNINGARMIKIL BÝARRÚM

Yvirskipaða málið við ferðsluætlanini er at betra viðurskiftini hjá fótgangarunum og sum frá líður at fáa meira frið í ávís býarrúm í miðbýnum. Hetta skal fara fram uttan neyðsemjur við parkeringsmøguleikum og lættari atgongd hjá teimum sum fara til handils í miðbýnum. Tað skal gerast við at arbeiða við fleiri parkeringshúsum, sum fara at gera broytingar í ferðsluni møguligar.
Sum frá líður verður minni gjøgnumkoyrandi ferðsla frá eysturbýnum til vesturbýin. Í dag gongur stórur partur av ferðsluni gjøgnum miðbýin. Ferðsla úr eysturbýnum til vesturbýin skal leiðast uttan um miðbýin eftir ringvegnum. Elektroniskir pullertar á útvaldum strekkjum skulu tryggja, at einans fólk, ið hava serlig ørindi, koyra í gøtuni.



Steinagøta og ovasti partur av Niels Finsensgøtu verða stongdar fyri bilferðslu, tá tað nýggja Torgið við Steinatún stendur liðugt.



Vágsbotnstorgið og Skálatrøð skulu gerast meira friðarlig við tað, at gjøgnumkoyrandi ferðsla og tey sum ætla at parkera ikki verða har í framtíðini.



Undir Bryggjubakka verða uppsettir elektroniskir pullertar, sum avmarka bilaferðsluna á vegsstrekkinum um summarið.



## NÝGGIR GEIRAR TIL BILPLÁSS

Tórshavnar Kommuna  samtykti á vetri 2015 ein parkeringspolitikkn fyri býin, sum eisini fevnir um miðbýin. Endamálið við hesum politikki er, at skipa eina einfaldari og gjøgnumskygdari parkeringsskipan í kommununi og samstundis tryggja, at tey parkeringspláss, ið eru, verða brúkt so væl sum til ber.




Parkeringsætlanin ruddar í nógvum av parkeringsreglunum í miðbýnum og setur nýggjar bilgeirar, sum fara at geva greiðari yvirlit.



Sum nakað nýtt fáa tey, sum búgva í miðbýnum, parkeringskort, so tey fáa betri parkeringsviðurskifti.



Sum frá líður, verður arbeitt við at stovna ein felags parkeringsgrunn fyri Havnina. Parkeringsgrunnurin skal leggja grundina undir at fíggja parkeringsloysnir í framtíðini.

## BILHÚS

Miðbýarætlanin arbeiðir við einari miðfirraðari parkeringsætlan fyri miðbýin. Tað merkir, at miðbýurin ikki fær eitt einstakt men fleiri bilhús. Fyrimunurin er, at bilstjórin altíð kann velja sær tað bilhús, sum liggur tættast hagar hann ætlar sær. Samstundis fer ein miðfirrað ætlan við fleiri bilhúsum at gera sítt til at spjaða ferðsluna meira, so tað slepst undan bíðirøðum. Miðbýarætlanin visir á 5 nýggj pláss, har bilhús kunnu verða sett. Plássini hava øll beinleiðis atgongd frá innara Ringvegi ella stórum innkoyringarvegi. Í miðbýnum fer sostatt at verða komið frá ringvegi inn í bilhús og út aftur á ringveg. Á tann hátt kann gjøgnumferðsla verða beind úr miðbýnum.



Dømi um smá bilhús í trimum hæddum. Miðbýarætlanin miðar eftir, at Skálatrøð verður raðfest sum fyrsta bilhús í miðbýnum. Haðan verður innkoyring frá Landavegnum/Gríms Kambangøtu.



Miðbýarætlanin miðar eftir, at Kongabrúgvin verður raðfest sum annað bilhús í miðbýnum, tí eitt bilhús her fer at kunna gera gera Áarvegin einvegis við tí í hyggju at lata Havnará upp aftur seinni.



Dømi um føroyska list, sum prýðir bilhús í Horsens. Eitt bilhús til 200-300 bilar verður stórur bygningur í miðbýnum. Tí er umráðandi, at list og útsjónd verður gjøgnumhugsað og verður ein heild.

## ELEKTRONISKAR PARKERINGSÁVÍSINGAR

Til tess at tryggja, at ferðslan gongur smidliga og fyri at stimbra miðfirraðu parkeringsætlanina, hevur miðbýarætlanin saman við parkeringspolitikkinum í hyggju at arbeiða við elektroniskari parkeringsávísing. Bilstjórarnir verða kunnaðir um tøk pláss longu, tá ið teir koma inn í býin, og soleiðis verður ferðslan beind hagar, neyðugt er, og tey, ið leita eftir plássi fara at fækka í stórum.  Elektroniskar bilávísingar gera tí sítt stóra til at gera partar av miðbýnum friðarligar til dømis Vágsbotn, har stórur partur av ferðsluni nú er óneyðug ferðsla, sum leitar eftir bilplássi.




Dømi um elektroniska kunningartalvu við innkomuveg. Kunningartalvur fara at vísa tøku bilplássini og verða eisini brúktar til lýsingar/kunningar hjá Kommununi, til tiltøk og tað, ið annars hendir í býnum.




Dømi um parkeringsávísing frá innkomuvegi/ringvegi, sum beinir ferðsluna yvir í  tey bilhús, har pláss eru.




Dømi um beinleiðis ávísing til eitt bilhús. Skeltini tætt við bilhúsini síggja til, at fólk bara fara inn í húsið, um pláss er.


P-PLÁSS
P-HÚS
GLAÐSHEYGGUR
P-HÚS KONGABRÚGVIN
P-HÚS SMS
P-HÚS BØKJARABREKKA
BÝRÁÐSPLÁSSIÐ
P-HÚS TÓRSGØTA
P-HÚS
KOMMUNUSKÚLIN
GRØNT PARKERINGSPLÁSS
P-HÚS SKÁLATRØÐ

# GAGNNÝTIÐ TAÐ GRØNA OG TAÐ BLÁA

Tað, sum eyðkennir miðbýin í Havn eru mongu grønu blettirnir - bæði urtagarðar og almenn pláss og sambandið við havnina og sjógvin. Her eru stórir møguleikar, sum skulu troytast meira.

Trupulleikin er, at fleiri av grønu blettunum eru tilvildarligir og ringir at koma til, goymdir aftan fyri múrar og stik. Verða skelti sett upp, múrar og stik fyri ein part tikin niður umframt onnur tiltøk, fara fleiri av grøu blettum býarins at verða nógv meira lokkandi og natúrligur partur av býnum. Amtmansgarðurin er eitt gott dømi um alment grønt býarpláss, sum kundi givið Áarvegnum og býnum í síni heild nógv. Annað dømi er kirkjugarðurin á Svínaryggi, sum ferðandi og borgarar als ikki finna longur, og mongu søguligu slóðirnar og søgurnar verða ikki sagdar. Nýggja spæliplássið í Grasagarði er hinvegin eitt dømi um grønan blett, sum verður nógv betur brúktur og sum hevur fingið lív, tí hann hevur fingið nýtt endamál. Tað hevur gjørt økið, sum ikki so mong brúktu, til eitt væl vitjað pláss við nógvum virksemi.

Framtíðin fyri stóru havnaøkini á Eystaru- og Vestarubryggju er framvegis óviss. Bæði eru øki við góðum møguleikum fyri býarmenning, men tey mugu verða neyvari skipað til tess at tryggja, at atlitið at vinnu og ídnaði kann verða gjørt saman við t.d. bústøðum og skrivstovum á rættan hátt. Miðbýarætlanin miðar tí eftir, at Tórshavnar kommuna ger eina rættiliga havnarætlan fyri býarmenningarøkini. Tað merkir kortini ikki, at havnarøkini og sjógvurin ikki skulu kunna mennast, meðan bíðað verður eftir eini býarmenningarætlan fyri Eystaru- og Vestarubryggju. Miðbýarætlanin miðar eftir, at skipað verður eitt samanhangandi havnarsamband fram við øllum bryggjukantinum í miðbýnum. Eitt nýtt samband við spákingargøtu, sum sambindur grøna økið Yvir við Strond allan vegin fram við miðbýnum og út ímóti Sandagerði. Nýggja spákingargøtan savnar alt virksemið og skapar nýggjar møguleikar fyri dvøl, leiki og ítrivi á sjónum.

Fram við nýggja sambandinum eru nógv býarpláss - nýggj sum gomul. Eisini er sjálv sjóflatin býttur í geirar. Saman er sambandið ein yvirskipað ætlan fyri fríløtuvirksemið fram við sjónum. Við býarlívi, býarplássum og virksemi í brennideplinum skapar miðbýarætlanin karmar um, at bæði nýggir bygningar og virksemi, bæði privat og alment, kunnu stinga seg upp, sum frá líður.

HAVNALAGIÐ | FISKIBÁTAR OG FRÍTÍÐARSIGLARAR

Økið undir Bryggjubakka verður styrkt sum eitt øki, har fremmandir bátar kunnu leggja at og fiskur verður avreiddur. Ferðafólkbátarnir verða fluttur út á eina brúgv niðan fyri Østrøm.





RÓÐRARFELAG | FELAGSHÚS



BÁTABRÝR | STUTTLEIKABÁTAR

Stóra økið við stuttleikabátum verður varðveitt. Seinni verða bátabrúgvarnar skiftar og gjørd verða verulig býarpláss við betri møgulekum til dvøl enn nú.



SAMBAND VIÐ HAVNALAGIÐ | SPÁKINGARVEGUR

Sum frá líður skal kaikanturin verða gjørdur til eina veruliga spákingargøtu har til ber at seta seg, spæla og til ber at koma oman á sjógv eftir trappum. Kanturin skal verða eitt fríløtupláss.


ÁSKOÐARAPLÁSS | VATNÍTRÓTTUR
Fyri at økja áhugan fyri sjóítrótt og rógving kunnu áskoðarapláss/torn verða sett upp t.d. við ítróttarøkið við Kongabrúnna og róðrargeilirnar á ólavsøku.
TORN | VIEWPOINT
Útsýnistorn ytst á havnarmolunum kunnu vera lokkandi mál hjá býarborgarum.
MARITIMUR ÍTRÓTTUR | SPÆL
Sum frá líður verður økið við Kongabrúnna sjóítróttarøki. Økið liggur vart og er gott til kajakkpolo og annað og kann virka t.d. saman við teimum róðarfeløgum, sum eru
KAJAKK OG FROSKMENN | FELAGSHÚS
YVIR VIÐ STROND
BÁTAFELAGIÐ | FELAGSHÚS
VIRKSEMI Á HAVNALAGNUM
VIRKSEMI Á HAVNALAGNUM
ÚTLENDSKIR STUTTLEIKABÁTAR | NÝGGJ ATKOMA
Nýggj bátabrúgv verður gjørd til ferðafólkabátarnar. Nýggja brúgvin fer at lokka ferðafólk oman partin av havnini, sum er niðan fyri Østrøm og pakkhúsini.
RÓÐRARFELAG | FELAGSHÚS
SANDAGERÐ
HAVNALAGIÐ | SØGULIGIR BÁTAR

## BØTA SAMBANDIÐ FRAM VIÐ SJÓNUM

Av tí at framtíðin fyri nøkur av stóru havnaøkjunum enn er óviss, leggur miðbýarætlanin dentin á at skapa betri sambond og betri býarpláss fram við havnini og sjónum. Betri býarpláss og sambond kunnu longu nú verða gjørd nýggj og fara at vera grundalag undir útbygging við bústøðum og vinnu seinni.

Møguleikarnir við sjálvum kajkantinum eru, sum nú er, ikki serliga væl brúktir. Har kunnu lættliga gera skapt áhugaverdari fríløtupláss heilt niðri við sjógvin.



Ein kaikantur til fríløtuvirksemi við trægongubreytum o.ø. fer at kunna skapa nýggjar møguleikar fyri dvøl og spæli og fer at draga fólk oman ímóti sjónum.



Ein nýggj havnargongubreyt kann verða gjørd saman við smáum klubbahúsum til t.d. sjóítróttarfeløg ella smáar handlar ella t.d. felags atgongumerkjasølu og goymsluhøli til teir nógvu ferðafólkabátarnar.



Sum nú er, er sambandið fram við havnarlagnum ikki í einum. Forðingar eru t.d við Müllers pakkhúsi. Sambandið skal vera í einum, og nýggjar gøtur verða gjørdar, har neyðugt er.

## SLEPPA FRAMAT SJÓNUM

Sjógvurin gevur miðbýnum øgiliga stórar møguleikar, sum ikki verða fullnýttir, tí til dømis er nógvastaðni trupult at koma oman til sjógvin. Nógv av tí virksemi, ið har er, sæst heldur ikki. Til dømis venja róðrarbátar úti í havnarlagnum, men fá ferðafólk og fái borgarar síggja tað.

Samstundis verður sjóflatin alsamt meiri brúktur. Til dømis eru alsamt fleiri kajakkir, vatnskootarar, ferðafólkabátar og onnur, ið brúka havnarlagið saman við ferjum, vinnu o.ø.

Sambandið millum land og sjógv skal betrast við trappum, útsýnispallum o.s.fr.



Dømi um eitt havnarspák við dvøli, har ið slepst oman á sjógv.



Verksemið á sjóflatanum verður sjónligari, til dømis við áskoðaraplássum til kappingar og stevnur. Her er eitt dømi um áskoðaratorn í havnini í Århus.



Havnarlagið gyrðir miðbýin inni, so eingin fær sannan varhuga av Atlantshavinum. Sum partur av havnarútbyggingini kunnu kagtorn verða sett fram við molanum, sum veita vanliga borgaranum høvi at hyggja út á sjógv.

## BETRI UMSTØÐUR TIL FERÐAFÓLKABÁTAR

Í løtuni leggja allir ferðafólkabátar og skjóttgangandi bátar sum NAX og RIB til undir Bryggjubakka. Alsamt vaksandi virksemið leggur trýst á økið og smávinnu, sum kaffistovur, fiskasølu o.a. Eisini manglar ferðafólkabátum gloymsluhøli og annað.

Miðbýarætlanin miðar eftir at gera eina nýggja brúgv til ferðafólkabátarnar á Skálatrøð undir gomlu pakkhúsunum og Østrøm. Her kann miðdepil verða gjørdur fyri ferðafólkabátarnar, sum kunnu draga virksemið á havnarlagnum heilt oman til Østrøm og fáa meira lív í tað økið enn har tað er í løtuni. Samstundis verða umstøðurnar hjá ferðafólkabátunum bøttar, og teir fara ikki at leggja trýst á bryggjuna undir Bryggjubakka.



Nógvir ferðafólkabátar hava stóran tørv á goymsluplásssum til bjargingarvestar, búnar og annað.



Ein bátabrúgv kundi verið skipað sum eitt lítið býárpláss til teirra, ið bíða eftir bátunum.



Felagsláss til ferðafólkabátarnar og goymslu og atgongumerkjasøla kundi skapt ein góðan miðdepil fyri ferðafólk, sum ætla sær at sleppa út á sjógv.



# FLEIRI BÚSTAÐIR Í BÝIN

Miðbýarkjarnan sýnist at tørva bústaðir, soleiðis at virksemi í miðbýnum verður meiri fjølbroytt. Bústaðir hava ikki bara tann eginleikan, at teir skapa lív um kvøldarnar, men borgarin búsitandi í miðbýnum tekur miðbýin til sín sum sín heilt egna og serliga.

Kommunuætlanin staðfestir, at Tórshavnar kommuna ynskir meirbygging í miðbýnum, tó skal meirbygging í miðbýnum gerast á ein skynsaman hátt. Neyðugt er at tryggja, at verandi miðbýar góðska og eyðkenni verður varðveitt, meðan býurin mennist støðugt.

Seinastu árini hevur gongdin verið, at kommunan fer longur og longur niðan í fjøllini at gera útstykkingar. Hetta er ein sera óheppin tilgongd, tá hugsað verður um neyðuga tilfeingi, so sum veitingar, leiðingar, almenna og privata ferðslu o.s.fr., sum hesar útstykkingarnar hava við sær. Harumframt er hetta ein tilgongd, sum í miðbýnum serliga vísir seg aftur við, at borgarin í minni mun hevur tørv á at koma oman í miðbýin, og sostatt heldur ikki tekur miðbýin til sín á saman hátt, sum borgarin, sum býr í býnum, ger.

Hugt hevur verið eftir hvørji øki kunnu loyvast at byggjast tættari og møguliga eisini nakað hægri, umframt at hugt hevur verið eftir økjum í miðbýnum, sum eru varðveitingarverd í mun til verandi bygningstættleika, bygnað, samanseting og bygningseyðkenni. Kortið á næstu síðu vísir, at framvið miðstaðargøtuni verður mett, at møguligt er at byggja tættari og hægri, somuleiðis vísir kortið á nøkur økið, sum mett vera at skula varðveita verandi bygnað.

Økið framvið miðstaðargøtuni er longu í dag rættiliga ymiskt í samanseting, tættleika og hædd. Nógvir av bygningunum, sum í dag eru framvið miðstaðargøtuni eru 4 hæddaðir bygningar, tó er rættiliga stór frávik í summum førum. Hesi frávikini kunnu eisini vera sereyðkenni við verandi býi, men samanumtikið verður mett, at hetta strekkið verður styrkt við at loyva tættari og hægri bygging.

Miðbýir hava tørv á fjølbroyttum virksemi. Í dag er virksemi framvið miðstaðargøtuni rættiliga einstátta við privatum vinnuligum virksemi ella almennum stovnsvirksemi. Hetta vísir seg aftur í, at miðbýurin saknar gerandislívið hjá vanliga borgaranum, sum serliga gevur býnum lív um kvøldarnar, tá nógv av dagvirkseminum er latið aftur.

Uppgávan hjá kommununi er at gera tað møguligt at byggja tættari og hægri framvið miðstaðargøtuni í framtíðini, og so er ynski, at privatu íleggjarnir/bygningseigarir síggja møguleikarnar í at umraðfesta bygningarnar, soleiðis at teir bæði fevna um ymiskt alment virksemi, sum kemur borgarunum tilgóðar, umframt at bygningarnir í størri mun verða innrættaðir til bústaðir, sum serliga kemur at styrkja um samleikan, kvøld- og náttarvirksemið í miðbýnum.


MIÐSTAÐARGØTA
TÆTTLEIKI - EIN MØGULEIKI
VERANDI BYGNAÐUR SKAL VARÐVEITAST

## TÆTTLEIKI FRAMVIÐ MIÐSTAÐARGØTUNI

Burðardygg býarmenning verður oftast framd við umskapan og við at økja um tættleikan í býnum. Fyrst av øllum skal býarmenning í størstan mun fremjast innan fyri verandi býarkarmar, soleiðis at man í størst møguligan mun sleppur undan at taka nýggj økir til býarmenning. Tættleiki framvið miðstaðargøtuni skal gerast við skynsemi, soleiðis at tættleikin er við til at styrkja um virksemi framvið gøtuni. Tað er týdningarmikið, at býarmenningin fer fram við miðbýargóðsku í huganum. Hetta merkir, at niðasta hæddin ella atkomuhæddin verður innrættað til útvent virksemi, sum kemur almenninginum til gagn, meðan bústaðir verða innrættaðir í ovaru hæddunum. Somuleiðis er alneyðugt at taka støðu til hvussu parkering og bilar verða handfarnir í hesum tættleikaøkinum.

## ØKIR TIL TÆTTLEIKA

Vanligt er, at kommunur arbeiða strategist við at økja um tættleikan í miðbýum og at umskapa forlátin vinnu- og havnaøkir við millum annað at umbyggja ella útbyggja tey, umframt at endurnýta niðurlagdar vinnubygningar, havnaøkir og aðrar tómar bygningar og økir til nýggj endamál. Tórshavnar kommuna hevur somuleiðis fleiri líknandi økir, sum heilt ella partvís kunnu takast í nýtslu, umbyggjast ella endurnýtast til at skapa nýtt og øðrvísi lív í miðbýnum. Hesi økir geva møguleikar fyri at staðseta størri virksemi inni í býnum, sum annars vildi verið torført at kunna staðsett, grundað á manglandi økir. Tá tílík økir verða tikin til annað ella nýtt endamál, er tað týdningarmikið at tryggja, at nýggja endamálið stuðlar upp undir tað ynskta virksemið, sum miðbýurin hevur tørv á, fyri at gerast enn meiri áhugaverdur at vitja og búleikast í.

## EYÐKEND ØKIR VERÐA VARÐVEITT

Miðbýurin er í dag ein samansettur og fjølbroyttur býur, sum er eyðkendur fyri serliga býarbygnaðin, samansetingina, serliga bygningseyðkenni, litirnar o.s.fr. Tað er av stórum týdningi, at Tórshavnar miðbýur varðveitir hesi sereyðkennir, soleiðis at Havnin framhaldandi hevur sítt egna virði og ikki fær ein heilt øðrvísi býardám enn tann, sum í dag sereyðkennir býin. Økini Undir Glaðsheyggi, úti á Reyni, Rabarbukvarteri og Bøgøta/Tróndargøta eru økir, har bygnaðurin er sermerktur við mongum fríttstandandi bygningum/sethúsum. Hesir økispartarnir líkjast ikki øðrum miðbýum og skulu sostatt í størstan mun varðveitast. Hesin byggiháttur hevur sín uppruna í føroyskum byggisiði, og fyrimunir eru við túnunum og smáu sniðgøtunum, ið geva lívd, umframt at upplivingin av býnum kann broytast alt eftir hvar í býnum tú ferðast.



Set krøv til virksemi og opinleiki í gøtuhæddina. Eisini skal vera møguligt at tekja útyvir og at øki til uppihald fram við framsíðunum.



Eitt dømi uppá, hvussu ber til at skapa tættleika á miðstaðargøtuni við eini glasframsíðu og handli í gøtuhæddini. Byggilistin víkur tó frá byggingini í økinum.



Í framtíðini skal kommunan hjálpa við parkeringsviðurskiftunum, soleiðis at gøtuhæddin verður gagnnýtt til fulnar.



Býarplanlegging í dag leggur upp til hava ymiskt virksemi undir somu tekju, sum økir um ymsa nýtslu á einum øki.



Við Havnargøtu er stórur møguleiki fyri at tætta í miðbýnum við bæði bústøðum, parkering og handli, tí økið er óbygt, hóast nógv dagligt virksemi er á økinum.



Tjóðleikhúsið er staðsett á Skálatrøð, har mentan og parkering skal undir somu tekju.



Serstaka og hugnaliga byggingin í miðbýnum skal varðveitast. Her síggjast tey smáu litríku húsini fram við Tróndargøtu.



Tætta byggingin í Tórshavn er merkt við smærri geilum og skotum, og er tað serliga sjónligt úti á Tinganesi og á Reyni. Í sama øki síggjast eisini tey sermerktu túnini uttanfyri tey flestu húsini.



Undir Glaðsheyggi er eisini sermerkta tætta byggingin í Tórshavn. Við endan á vegnum liggur eisini býlingurin undir Ryggi við teimum smáu svørtu húsunum.



## MIÐBÝURIN - HØVUÐSSTAÐSINS LEIKPALLUR

Tórshavn er høvuðsstaður Føroya. Tað er kraftdepilin í landinum við øllum tí virksemi, ið hoyrir til ein høvuðsstað so sum Tjóðleikhús, Løgting, tjóðarleikvølli, fróðskaparsetri, landssavni, listasavni og stór mentanardeplar sum t.d. Norðurlandahúsið. Tað er ein sterkur høvuðsstaður við bæði mentan, handilslívi, ítrótti o.ø.

Í dag liggja fleiri av hesum funktiónunum uttanfyri miðbýin, men ístaðin fyri at síggja hetta sum ein trupulleika, vísir miðbýarætlanin á hetta sum ein fyrimum, at miðbýurin hevur so nógvar góðar grannar. Grannarnir hava nógv gott virksemi, meðan miðbýurin hevur nógv vitjandi, bæði borgarar, ferðafólk og bygdafólk úr øllum Føroyum. Tað liggur ein risa stórur møguleiki í at fáa vernadi kraftdeplarnar til at geva eitt íkast til lívið í miðbýnum í framtíðini.

Tí skal miðbýurin í framtíðini hugsast sum høvuðsstaðsins leikpallur. Tað er her Tórshavn, og allar Føroyar presentera tað besta innan úr býnum og landinum innan ítrótt, handil, mentanarlív, søgu, felagsskapir, matmentan o.s.fr.

Hetta kann gerast við, at býarplanleggingin skapar betri rammur fyri fyribils virksemi so sum pallar, tekjur, pláss sum kunnu inntakast o.s.fr. Støð í miðbýnum sum eru so áhugaverd og innbjóðandi, at nábúgvarnir natúrligt fara at nýta hendan møguleikan í miðbýnum við at skapa tiltøk.

Í framtíðini vil tú sum borgari ein gerandisdag í miðbýnum kunnu renna teg í eina framsýning í miðstaðargøtuni, har Føroya Listasavn hevur eina listaframsýning við týðandi og spennandi listaverkum. Tað ger miðbýin spennandi sum ein framsýningarpall, umframt at Føroya Listasavn reklamerar fyri borgarum, ferðafólki og bygdafólki. Gongur tú víðari í miðbýnum rennur tú teg møguliga í nakrar sølubásar við føroyskari matmentan og á Býráðsplássinum hava ítróttarfeløg skipa fyri street hondbólti, meðan lesandi frá Fróðskapur Føroya nýta trappuna í Vágsbotni til ein uttandura fyrilestur.

Miðbýurin sum høvuðsstaðsins leikpallur - her vísa teir mongu og góðu grannarnir seg fram og presentera, hvat tey kunnu. Tað skapar lív í miðbýin, umframt at ljós verður varpað á grannarnar hjá øllum teimum vitjandi í miðbýnum.


YVIR VIÐ STROND
FRÚUTRØÐ
KONGAMINNI
GUNDADALUR
VIÐARLUNDIN
ÁLAKER
CAMPUSØKIÐ

## OPIN PLÁSS TIL STÓR OG SMÁ TILTØK

Tá býarrúmini í framtíðini verða uppraðfest, er tað týdningarmikið, at tryggjað verður pláss til bæði tey stóru og smáu uttandura tiltøkini sum konsertir, hátíðarligar talur, marknaðardagar o.a. Hetta verður gjørt við at tryggja, at plássini kunnu nýtast á ein hátt í gerandisdegnum, men eru broytilig nokk til at kunna broyta skap og nýtast til meiri frítt í sambandi við tiltøk. Fyri at gera tað so lætt sum møguligt, er tað eisini týdningarmikið, at ljósseting og at tað er lætta at fáa streym verða hugsaðir inn í tilevningina av plássunum. Smáir pallar, beinkir sum eisini kunnu nýtast sum framsýningarpallar, flytiligir standarar til plakatir o.s.fr. kunnu eisini hjálpa til við at gera býarrúmini innbjóðandi og lótt at nýta á øðrvísi hættir.

## SMÁAR TEKJUR OG FLYTILIGIR BÁSAR

Fyriuttan plássini, sum kunnu nýtast til stór og smá torg, er tað týdningarmikið at skapa møguleikar fyri býarlívi alt árið, eisini tá ikki viðrar. Í staðin fyri at leggja miðbýin undir tekju, verður arbeitt við at skapa fleiri smáar tekjur/yvirdekkingar, glashús og básar, sum kunnu nýtast av borgarum, felagsskapum og annars øllum áhugaðum, sum eisini ynskja at brúka miðbýin sum høvuðsstaðsins leikpall, og vísa fram júst tað, sum tey kunnu. Tað er týdningarmikið, at tað ikki bert vera tey stóru og yrkisligu feløgini, sum festivalar sum kunnu vísa seg fram í miðbýnum. Privatpersónar og smærri privat feløg skulu eisini vera vælkomin og kunna nýta miðbýin á sama hátt. Tað kunnu vera tríggir føroyingar, sum mála í frítíðini, sum sýna fram teirra listaverk , Tórshavnar mannskór sum hevur eina konsert í trappuni o.s.fr.

## ONE STOP SHOP - LÆTT SMBAND VIÐ TK

Um teir ymsu góðu nábúgvarnir, bæði yrkisligir stovnar, feløg og ítróttarfeløg eins og smáar privatar eldsálir, skulu kunna nýta miðbýin og teir møguleikar tey nýggju býarrúmini og tiltøkini leggja upp til og skapa, er týdningarmikið, at tað er lætt og einfalt at venda sær til kommununa. Tí leggur miðbýarætlanin upp til, at Tórshavnar kommuna í framtíðini skapar eina one-stop-shop - EITT stað, har tað er lætt at venda sær til og sum hjálpir einum víðari, um ein gjarna vil gera nakað í miðbýnum. Tað er týdningarmikið, at feløg, stovnar og privat vita, hvar tey skulu venda sær, og at tey hava ein góðan samstarvsfelaga í kommununi.



Nýggja innrættingin á Býráðsplássinum skapar eitt hátíðarligt og opið torg, sum ger tað lætt hjá borgarum og øðrum at nýta plássið til talur, heiðran av ítrótti o.s.fr.



Torgið í Vágsbotni er eitt dømi uppá eitt býarrúm, sum er blivið gjørt betri til stór tiltøk við tí nýggju trappuni, sum bæði kann nýtast sum áskoðarapláss ella umvent sum ein pallur.



Í nýggju trappuni eru nøkur av trinunum so mikið stór, at tey kunnu virka sum ein lítil pallur. Tað er somuleiðis lætt at fáa streym, umframt kann ljósið skifta litir og stýrast í mun til virksemi.



Tann nýggja tekjan við Perlutorgið er eitt dømi uppá eina yvirdekking, sum gjarna skal síggjast aftur aðrastaðni í miðbýnum. Lítil økir, sum gera tað møguligt, at skapa býarlív, tá tað ikki viðrar.



Kuben - eitt lítið glashús í Horsens, er eitt gott dømi uppá ein lítlan pall, sum allir borgarar í býnum kunnu læna, sum somuleiðis kann skapa karmar til tiltøk.



Flytiligar bingjur, sum kunnu nýtast sum sølubásar ella verkstøð, kunnu lænast frá kommununi og er eitt gott dømi uppá eitt lítið tiltak, sum ger tað møguligt fyri bæði privat og felagsskapir at vísa seg fram í býarrúmunum.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



M




# MEDIUM

BÝARRÚM | ÍTØKLIGAR VERKÆTLANIR

# PERLUTORGIÐ

Fleiri býarskipanarligir møguleikar eru við einum torgið, sum er undir taki. Sum partur av mentanargøtuni vil torgið gerast meiri brúkiligt undir taki, og har kunnu skipast alskyns mentanarlig tiltøk. Nevnast kunnu listaframsýningar, filmframsýningar o.s.fr. Harumframt kann torgið fevna um fyribils býarskipanarligar uppsetingar, soleiðis at borgarin hevur tiltøk/uppsetingar at vitja í miðbýnum. Til seinast skal nevnast, at økið víðkar um verandi virksemi í Perluni og Reinsarínum. Møguligt verður í størri mun at uppihalda sær á torginum, tá tiltøk eru í ávikavist Perluni og Reinsarínum.

Nú virksemið bæði í Perluni og Reinsarínum sum samlað tónleika- og mentanarstað hevur virkað eina tíð, er hugskot um at fáa skipað uttanduraøkið uppí við at tekja útyvir. Ein glastekja verður sett út yvir torgið, ið skal leggja upp til ymiskt virksemi fyri allan miðbýin. Talan er um eina stálkonstruktión við herdaðum glasi.

Um býurin skal kunna gera gagn av torginum og veggjunum rundanum, er tað av stórum týdningi, at tað eitt nú er møguligt at sýna filmar og grafikk upp á veggirnar.

Somuleiðis kann sigast, at estetiskt hóskar glastakið væl til verandi Perlu og kann á henda hátt skapa eina eind. Tó hevur glastakið ein vansa, at torgið altíð verður undir taki, tí verður takið gjørt soleiðis, at glasflaturnar kundu flytast/vippast, soleiðis at sólin ein sólskinsdag sleppur niður á torgið.

Eisini verður ein nýggj álegging gjørd, umframt at nýtt innbúgv og ljós gerast ein partur av verkætlanini.



# KOMMUNUSKÚLIN

Visjónin hjá Tórshavnar kommunu sambært Kommunuætlanini er, at fleiri bústaðir skulu gerast í miðbýarøkinum. Upprunaliga virksemi í Tórshavnar kommunuskúla er fyri tíð síðani steðgað, og hevur skúlin síðani tá staðið tómur. Saman við ynskinum um at fáa fleiri bústaðir í miðbýin, so er ætlanin at innrætta írestandi hølir við ymiskum virksemi til gagn fyri býin.

Aðalmálið við umbyggingini er at skapa eitt býarligt og urbant kveikjandi umhvørvið, ætlað til allar aldursbólkar í samfelagnum. Verandi bygningur skal "retrofittast" til lestraríbúðir, almennar leigubustaðir, og til alment og mentanarligt virksemi, har arkitektonisku og søguligu virðini verða varðveitt. Umtalaði bygningur er einasti bygningur av sínum slag í Tórshavnar kommunu, og skal formur og snið virðast, soleiðis at bygningurin framhaldandi verður ein av sínum slag. Framsiðurnar skulu í størst møguligan mun ímynda verandi bygning, men er ynskiligt, at bygningurin letur upp til uttanumøkið, soleiðis at bygningurin í framtíðini verður innbjóðandi og fer at kennast sum partur av býarmyndini.

Verandi fimleikahøll verður frámatrikullerað, og fer Tórshavnar kommuna at innrætta høllina til eitthvørt, sum kemur býnum og borgarunum í kommununi til gagns. Restin av bygninginum, lonin út móti Sjúrðargøtu og Tórsgøtu, skal innrættast til lestraríbúðir og til alment og mentanarligt virksemi. Lonin út móti Sjúrðargøtu verður innrættað við íbúðum og verður kjallarahæddin partvís innrættað við virksemi tilhoyrandi lestraríbúðirnar. Um fermetrar verða til yvurs, so er ynskiligt, at hesir fermetrarnir verða innrættaðir soleiðis, at eitthvørt alment, møguliga mentanarligt virksemi kann innrættast í hesum fermetrunum.

Verandi Aula skal brúkast sum býarauditorium, har borgarin, felagsskapir o.l. kunnu nýta Auluna sum eitt stað at halda tiltøk, venjingar o.s.fr. Sama er galdandi fyri verandi sangstovu, sum verður innrættað til høli, sum kann brúkast til verkstovur, veitslur o.s.fr. Kjallara hæddin undir Auluni er lovað til listarligt virksemi, og skal einki gerast við sjálva innrættingina í hesum rúminum.

Lonin út móti Tórsgøtu skal partvís innrættast við íbúðum, men verður tøknirúmini í kjallara hæddini verandi, og skulu írestandi fermetrar innrættast soleiðis at møguligt verður at leiga út til kafé, matstovu ella líknandi.

Ynskiligt er, at bygningurin letur upp til ferðsluna uttanfyri bygningin. Tað skal tykjast lætt at koma inn í garðin, sum við tíðini fer at verða innrættaður sum eitt alment býarrúm til býin. Ynskiligt er, at garðurin verður skipaður í tilgongdini, soleiðis at garður og lendi/økið kring bygningin stuðlar upp undir nýggja virksemi í bygninginum.

Parkeringsplássini kunnu partvís vera framvið Tróndargøtu, men skal gangandi ferðslan tá skipast inn í garðin hjá Frk. Cohr. Harumframt kunnu nøkur parkeringspláss gerast í sjálvum garðinum.

Verkætlanin at gera/anleggja garðin er partur av aðrari býarverkætlan, og skal tí ikki íroknast kostnaðarmetingina av umbyggingunum av skúlanum. Tó skal parkeringin skipast og íroknast verkætlanina, soleiðis at nøktandi parkeringsviðurskifti verða fyri íbúgvarnar.

Tað er Tórshavnar kommuna saman við Bústøðum, sum standa fyri umbyggingini.



## STEINATÚN

Ferðsluæðrin í miðbýnum verður annað enn bert eitt ferðsluøki við parkeringsplássum. Nýggja verkætlanin leggur upp til at gera Steinatún til eitt uppihaldstorg burturav. Eisini verður ferðsluøkið víðkað við einum vegi afturat.

Eitt uppihaldstorg verður gjørt frammanfyri bankabygningin, ið skal leggja upp til uppihald eins og at bøta um viðurskiftini hjá fólki til gongu. Sum ein liður í at styrkja sambandið millum Steinatún og miðstaðargøtuna Niels Finsens gøtu, verður niðasta hæddin í bankabygninginum opna upp út ímóti uppihaldstorginum umframt at annað virksemi verður á hesi hæddini.

Í dag virka tey ymisku sløgini av áleggingum tilvildarlig og óskipað, og yvirgongdirnar eru ofta loysnir gjørdar í skundi. Í framtíðini skal áleggingin á torginum í miðbýnum evnast soleiðis til, at hann kann flættast saman við hinum sløgunum av áleggingum í miðbýnum og skapa flótandi yvirgongdir, sum virka natúrligar.

Steinatún og Býráðsplássið eru torg, sum venda sær í fleiri ymiskar ættir. Tann nýggja áleggingin verður blandað til eina álegging uttan ávísan rætning við 6 ymiskum støddum av flísum. Tað skapar eitt pláss, ið vendir sær til allar týðandi bygningar í økinum. Fyri at skapa eitt hátíðarligt pláss við býráðshússið, verður arbeitt við myrkari litum av antin granitti, føroyskum basalti ella við at blanda bæði. Tann myrka áleggingin stendur stendur sum týiligur mótsetningur til ta ljósu áleggingina í miðbýnum annars og hóskar samstundis væl til grótveggirnar í býráðshúsinum.

Verandi trø og nýggj grøn øki verða avmarkað við betongkantum, sum kunnu nýtast til uppihald. Kantarnir og ljósa áleggingin skapa eitt samanspæl og virka í mun til hæddarmunin og skapa somuleiðis eina trappu. Eyðkendu betongkantarnir skapa ein samanhang í alt býarrúmið.

Tvey hálvtak og lívdarskjól í glasi skapa eina størri tekju, ið gevur lívd til fólk, ið bíða eftir bussinum. Bleyta sniðið á tekjunum skapar ein samanhang tvørtur um vegin og ferðsluna og skapar ein samanhang í alt økið.

Busta betong eller hvítt asfalt á koyribreytini skapar eina ljósa yvirflatu, og saman við ljósu áleggingini skapar hetta ein samanhang í alt økið.

Upplivingin í Steinatúni gerst sostatt ein heildaruppliving, hóast koyribreytin skerur seg ígjøgnum økið. Skiftið frá asfalt til betong og ta bustaðu yvirflatuna skapar somuleiðis ljóð og virka til at bilarnir minka um ferðina.



## BÝRÁÐSPLÁSSIÐ

Býráðsplássið skal í framtíðini vera eitt torg, sum skal upplivast sum eitt samlað býarrúm, sum røkkur frá bygningi til bygning. Býráðsplássið skal vera eitt hátíðarligt býarrúm, sum hóskar til tær týdningarmiklu funktiónirnar og teir markantu bygningarnar kring torgið. Býráðsplássið er møtistað í miðbýðnum. Her verða talur hildnar, fótbóltslið heiðrað, og mótmælisfundir verða hildnir her.

Nýggja innrættingin av býráðsplássinum skal skapa eitt opið og smidligt pláss, sum ber til at innrætta til ymisk endamál og tiltøk. Vanliga stendur nýggja torgið sum eitt hátíðarligt pláss í miðbýnum, har nýggir beinkir og trø skapa smá, friðarlig tilhaldsøki, og ein nýggjur standari við kunningarskugga upplýsir um tiltøk í kommununi. Samstundis er ókeypis internet á torginum. Beinkir, ið kunnu flytast upp og niður, gera, at plássið broytist gjøgnum dagin. Tá parkering er á plássinum, eru beinkirnir niðri í áleggingini. Seinnapartin reisast beinkirnir upp, og bilar sleppa ikki inn á plássið, tá ber til hjá fólki til gongu at steðga á ella at seta seg.

Høvuðsrørslurnar á torginum verða betraðar við nýggjari trappu við býráðshúsið. Eisini verður latið upp móti Vaglinum við eini nýggjari sititrappu við Snarskivuna.

Parkering og bilar ráða á býráðsplássinum í dag. Nógv ymisk sløg av áleggingum, ójavnar og kantar gera, at býarrúmið kennist sundurbýtt og óskipað. Fleiri ymisk sløg eru av áleggingum og býarrúmsinnbúgvi, sum ger, at plássið ikki kennist sum ein heild, men sum eitt óskipað og uppdeilt býarrúm. Framtíðar býráðspláss vísir seg tí í býnum við einum samsvari í innbúgvi og einum slagi av álegging, sum røkkur frá bygningi til bygning og savnar býarrúmið í eina heild. Nýggja áleggingin skal somuleiðis tilevnast soleiðis, at hon kann flættast saman við hinum sløgunum av álegging í miðbýnum og skapa flótandi umskifti, sum kennist natúrligt.

Træið, sum stendur við Vaglið verður varðveitt og tvey nýggj trø verða sett strategiskt á plássið. Trøini avmarka tilhaldsøkini á torginum, sum eru har, ið fólkið gongur, umframt at tey standa í góðum sólargangi.

Uppihaldsøkini verða innrættað við kvadratiskum beinkjum úr steini, sum við einfaldum pallettlyftara kunnu flytast á plássinum til ymisk tiltøk. 5 beinkir í gróti vera á plássinum, og kunnu teir flytast upp og niður alt eftir, um plássið verður nýtt til parkering ella ikki. Tann nýggja innrættingin, ið ber til at flyta, ger plássið smidligt og hóskiligt at skipa fyri nógvum ymiskum tiltøkum.

Gerandisdagar, tá plássið skal nýtast til parkering, liggja beinkirnir ájavnt við áleggingina og síggjast ikki. Seinnapartar, um vikuskiftið og til serlig tiltøk, tá plássið ikki verður nýtt til parkering, verða beinkirnir lyftir upp og forða teir bilunum at koma inn á plássið.

Flytiligu beinkirnir í tilhaldsgeiranum verða vanliga ikki fluttir, uttan tá serlig tiltøk eru, men beinkirnir kunnu broyta plássið fleiri ferðir um døgnið og vera við til at gera miðbýin livandi og smidligan.

Sjónarmiðið við elektroniskari hækking og lækking er kend frá m.a. ferðslupullartum, sum verða nógv nýttir í gongugøtum til at stýra ferðsluni.



## SKÁLATRØÐ - EIN MENTANARDEPIL

Skálatrøð er kanska tað mest framúrskarandi økið at byggja á í Tórshavn. Økið liggur mitt í høvuðsstaðnum, tætt upp at virkseminum í býnum við góðum sambandi til havnalagið og vágna. Staðsetingin eigur at vera ætlað bygging, ið hevur mentanarligan týdning fyri Føroyar og føroyingar allar.

Skálatrøð liggur sera væl fyri í mun til handilslív, mentanarligt virksemi og matstovur, ið eru í miðbýnum. Við at staðseta tjóðpallin á Skálatrøð gerst hann sjónligur og framtrýnandi, og møguleikarnir fyri fruktagóðum samspæli við miðbýin og býarlívið annars eru góðir.

Fyri at gera Skálatrøð til ein sterkan mentanardepil, kann Tjóðpallurin, ið fyrst og fremst er virkin um kvøldið, samskipast við aðrar dag-funktiónir sum t.d. bókasavn, borgarahús ella líknandi. Á hendan hátt verður økið virkið so stóran part av samdøgrinum sum gjørligt. Við at staðseta annað mentanarligt virksemi í sama økið er eisini møguligt at skapa ávirka samvirkan, har ymisku funktiónirnar stuðla hvørji aðrari. Møguleiki er eisini at hava felagsfunktiónir sum t.d. eina kafé.

Skálatrøð er í dag týdningarmesta parkeringsplássið í miðbýnum. Í sambandi við bygging í økinum, er tískil neyðugt at hugsa parkeringsviðurskifti sum ein liður av verkætlanini.

Parkeringshús verður staðsett móti berginum aftanfyri eitt møguligt tjóðleikhús og eina triðju funktión. Samstundis verður ferðslan leidd burtur frá havnalagnum.

Lagt verður upp til, at Tjóðpallurin, sum er stórur í vavi við fleiri pallum, verður staðsettur vestarlaga í økið, har víddin er størst og har bestu møguleikarnir at byggja høgt eru.

Hin mentanarfunktiónin verður staðsett eystureftir, sum ein lægri bygningur, ið hóskar betri til smærru bygningarnar í miðbýnum og sum eisini kann virka innbjóðandi móti Vágsbotni og á henda hátt skapa samband víðari út eftir Skálatrøð.

Millum báðar funktiónirnar á Skálatrøð er møguligt at skapa eitt nýtt býarrúm. Hugsandi er at gagnnýta rúmið á tekjuni til eitt býarrúm, ið serliga er ætlað fólki til gongu til uppihald og leik. Rúmið kann eisini hugsast sum eitt bindilið millum virksemi í báðum bygningunum.

Myndin á næstu síðu er bert íblástur og eitt dømi uppá nakrar av kravfestingunum til Tjóðleikhúsið, og er ikki eitt ítøkiligt boð uppá sjálvt sniðið á bygninginum.



## VÁGSBOTNUR

Átøk eru gjørd í Vágsbotni, sum hava virkað til, at býarlívið er nógv vaksið í økinum - serliga um summarið. Søluplintar, kaféir við uttandura borðreiðing, gistingarhús, handlar, bátafelagið og stuttleikabátar seta sín hugnaliga og maritima dám á økið.
Eitt uppskot til at skipa torgið frammanfyri trappuna og miðlahúsið er at nýta íblástur frá gomlum myndum av eitt nú bátadráttinum í Vágsbotni. Somuleiðis er møguleiki at seta fleiri plintar í framhald av verandi søluplintum. Ein partur av økinum skal framvegis nýtast til bilferðslu til Skálatrøð, men koyribreytin skal avmarkast mest møguligt og ferðslan skal seyra ígjøgnum torgið.




Uppihald og uttandura borðreiðing myndar havnalagið undir Bryggjubakka. Húsini nýta plássið frammanfyri til uppihald og uttandura borðreiðing.




Gerandisdagur við vatni og spæli. Vatn skapar virksemi á plássum, og her kunnu børn spæla, meðan foreldur hyggja at frá kaffistovunum rundanum.




Tiltøk og hendingar á torginum í Vágsbotni, ið viðhvørt kann virka sum t.d. eitt handilstorg. Til tiltøk verður vatnið sløkt, og torgið kann t.d. nýtast sum handilstorg í vikuskiftum.

## KOMMUNUSKÚLAGARÐURIN - FYRIBILS RÚM

Í framtíðini skal garðurin gerast til eitt nýtt og spennandi býarrúm, har dentur verður lagdur á urbanan ítrótt og ítriv, sum t.d. fevnir um parkour, breyt til rennifjølir, bóltvallir og klatring v.m. Hæddarmunurin í garðinum er upplagdur at gagnnýta til parkering í miðbýnum.



Nýtt urbant býarrúm í kommunuskúlagarðinum. Býarrúmið skal avspegla eitt virkið býarrúm, har dentur verður lagdur á spæl og rørslu.



Parkour er ein ítróttargrein, ið seinastu árini hevur tikið dik á seg. Kroppurin er einasta amboðið í hesum ítrivi.



Urbanur ítróttur er til fólk í øllum aldri.

## ”KUBEN”

Kuben er nýttur í fleiri býum í sambandi við menning av miðbýum. Hann er við til at skapa fleiri mentanarlig tiltøk í miðbýum, soleiðis at ein miðbýur gerst eitt meiri livandi og spennandi stað at uppihalda seg í.

Kuben er eitt 6x6x6 metrar stórt gjøgnumskygt mentanarhús, sum virkar sum ein miðdepil fyri mentanarligar upplivingar av øllum slagi. Glasbygningurin kann nýtast alt árið til konsertir, sjónleik og framsýningar fyri mentanina, ítróttin og handilslívið í býnum. Øll kunnu nýta kuben og er hann ókeypis at læna.



Dømi uppá ”Kuben” í Horsens. Endamálið við bygninginum er at hava ein pall í miðbýnum, ið varpar ljós á allan býin við tiltøkum, framsýningum o.s.fr.



Bæði stór og smá tiltøk kunnu skipast á hesum palli. Eisini ber til at víðka virksemi út á gøtuna, t.d. í sambandi við eina konsert.



Við einum rúmi sum ”Kuben” ber til at fylla eitt heldur deytt øki út. Eitt lítið átak, sum kann skapa nógv virksemi í økinum.



## ÁARVEGUR - FYRIBILS TILTØK

Strekkið frá Kongabrúnni og niðan eftir Áarvegnum, ið leiðir ein inn í miðbýin, er eitt deytt øki í dag. Framtíðar æltanirnar fevna um eitt rekreativt øki, har Havnará og grøni vøksturin verða ein partur av býarmyndini við einari einvegis koyribreyt oman ímóti sjónum. Í tilgongdini í sambandi við at umskipa økið, verður farið í holt við at gera eitt fyribils býarrúm. Hetta rúmið skal endurspegla framtíðar ætlanir og geva borgarunum ein brellbita av, hvussu strekkið fer at síggja út í framtíðini.



Áarvegurin ber bert bráð av tvørgangandi ferðslu og parkering í dag. Í sambandi við at gera eina verandi loysn á staðnum, ber til at arbeiða við einum fyribils býarrúmi - einum small átaki.



Dømi um fyribils býarrúm á einum vegi, ið gevur borgarunum ein brellbita av, hvussu økið kann vantast at síggja út í framtíðini.



Dømi um eitt fyribils átak á einum vegi.

## ÁARVEGUR - LATA HAVNARÁ UPP

Áarvegurin var í gomlum døgum ein av okkara týdningarmestu vegum, men hevur vegurin og virksemið seinastu árini tikið annað skap, har ferðslan skarar framúr.

Miðbýarætlanin leggur upp til at skipa ferðsluna við einvegis ferðslu oman eftir Áarvegnum, soleiðis at rúm verður fyri at lata Havnará upp og skipa økið sum eitt innbjóðandi øki við uppihaldi. Somuleiðis er ynskiligt at lata Amtmansgarðin upp, soleiðis at grøni garðurin gerst partur av uppihaldinum í økinum. Harumframt skal bleyta ferðslan raðfestast fyri at skapa trivna hjá fólki til gongu og á súkklu.




Bilarnir við teimum trimum farbreytunum til tvørgangandi ferðslu og parkering ráða býarmyndina á Áarvegnum í dag.




Áin skal latast upp og ein nýggjur geiri skal gerast. Verður vegurin einsrættaður er pláss at lata Havnará upp, víðka geiran til fólk til gongu og á súkklu.




Amtmansgarðurin verður latin upp, og vit fáa harvið eitt sera gott øki til uppihald við góðum sólargangi fram við Havnará, sum verður latin upp aftur.

## KONGABRÚGVIN

Havnargøta verður umskipað við nýggjari íbúðarbygging og parkeringshúsi inn móti høga grótvegginum niðan fyri Skansavegin. Byggingin kann gerast í terassum oman móti havnini fyri at bróta hæddarmunin á framsíðuni, umframt at allar íbúðirnar fáa besta sólargangin. Eisini vil byggingin á hendan hátt ikki gerast so ógvuslig út ímóti havnalagnum við smáu stuttleikabátunum og maritima ítróttinum.

Í gøtuhæddini út móti havnalagnum kunnu vinnuligt virksemi og kaffistovur halda til. Tað skapar eitt meiri býarkent samband inn til Kongabrúnna. Vitjandi, sum ætla sær inn í miðbýin í framtíðini, kunnu koyra beinleiðis til eitt parkeringshús av ringvegnum Yvir við Strond, og kunnu tí skjótt og væl koma inn ímóti einum spennandi býarumhvørvi.



Framtíðar bygging kann hava ymiskt virksemi undir somu tekju, umframt at byggingin kann lagast til økið við at arbeiða við skapinum á sjálvum bygninginum.



Kongabrúgvin kann í framtíðini bjóða borgarunum eitt spennandi býarumhvørvið, har vinnuligt virksemi, bústaðir og parkering ganga hond í hond.

Myndin omanfyri kann geva íblástur til at skapa eitt øðrvísi og meiri býarkent umhvørvi á Kongabrúnni enn tað, sum er í dag.


HOTEL
HAFNIA
Havnará latin upp
skrái móti vestri
gongu og súkklubreyt
gongubreyt og uppihald
handil | Sirri
Áarvegur | einsrætta
Amtmannsgarðurin

S



# SMALL

SAMSTARV OG ELDSÁLIR | FYRIBILS ÁTØK SUM AMBOÐ


summar
tiltøk
kvøld
BRÚKARAR
dagtími
vetur
gerandislív





INTERAKTIV REIGGJUINSTALLATIÓN



STREET ART



LJÓS OG LJÓSINSTALLATIÓNIR



BÝARSKÓGUR



MINITRAMPOLINIR



ØKIÐ TIL URBANT ÍTRIV




SKELTING



FLYTILIGIR FRAMSÝNINGARLUTIR



STUTTLEIKAHAVN



URBANT ÍTRIV



URBANIR UTRAGARÐAR



LJÓÐFLÍSAR


ELDSÁLIRNAR
REYNANEVNDIN
FRÍTÍÐARFELØG
TÓRSHAVNAR KOMMUNA
UNGDÓMSRÁÐIÐ
VISIT TÓRSHAVN
VIÐLEIKARAR
TIL EIN VÆLVIRKANDI MIÐBÝ
AMBOÐ ÚTEFTIR
MIÐBÝARFELAGIÐ
PRIVATIR ÍLEGGJARAR
TEKNISTOVURNAR
ELDRARÁÐIÐ
VINNULÍVSFELØG



# VIRKISÆTLAN

MIÐBÝURIN I ÁTØK

## VIRKISÆTLAN

Menningarmøguleikarnir í miðbýnum eru stórir, bæði tá talan er um ábøtur av verandi miðbýi og í sambandi við at seta nýggjar verkætlanir í gongd.

Fyri at halda fast í eini positivari menning og broyting av miðbýnum, er tað týdningarmikið at síggja miðbýarætlanina sum eina menningar ætlan, sum samstundis varðveitir tað sermerkta í miðbýnum.

Eitt yvirskipað og einkult átak sum bæði er strategiskt og fysiskt kann virka sum stýriamboð í sambandi við víðari menningina av miðbýnum í Tórshavn.

Virkisætlanin skal vera sterk nokk til at halda fast og kunna menna tær visjónir og tað virðisgrundarlag, sum politikkurin peikar á. Hon skal vera smidlig til at kunna taka ímóti nýggjum hugskotum og viðleikarum. Og ikki minst skal virkisætkanin kunna seta ítøkilig átøk og nýggjar verkætlanir í gongd.

Býarmenningin í miðbýarætlanini vísir á dømi, hvussu tey ymsu átøkini í large, medium og small koma til sjóndar í verandi bygging, og hvussu býarrúmini skulu upplivast og mennast.

Býarplanlegging av býum og býarpørtum hevur við tíðini førka seg frá eini lærigrein, ið hevur lagt største dentin á tað funktionella, til at leggja dent á virðisgrundarlagi hjá núverandi og komandi íbúgvum.
Virkisætlanin ynskir at vísa á eina virðisgrundaða menningarætlan, sum er so broytilig, at hon kann taka ímóti framtíðar samfelagsbroytingum, nýggjum virðisgrundarlagi og framtíðar verkætlanum í miðbýnum uttan at vikna í mun til yvirskipaðu átøkini og grundleggjandi hugsanirnar.

Átøkini við ferðslu, parkering, tættleika o.s.fr. eru øll evni sum miðbýarætlanin peikar á. Hesi eru ikki aleina grundarlagið fyri valið av átøkum. Átøkini eru vald, tí tey innanhýsis hanga saman og ávirka hvørt annað.

Virkisætlanin leggur dent á bæði størri og smærri átøk, og skal ætlanin síggjast sum eitt dømi uppá menningina í miðbýnum í Tórshavn. Heildarætlanin er broytilig, men skulu øll átøk gerast í mun til ásetingarnar í Large.



## RAÐFESTINGAR

Miðbýarætlanin skal vera kommununnar uppskot til eina ætlan fyri henda býarpart í kommununi, sum politiska skipanin eigur at brúka sum stýringsamboð í komandi raðfestingum.

Miðbýarætlanin hyggur langt fram í tíðina og vísir á yvirskipaðu hugsanirnar við býnum, samstundis sum víst verður á ítøkilig fyribils tilboð í gerandisdegnum og størri verkætlanir, sum í størri mun broyta og menna býin langskygda. Hesi ymisku átøkini, sum nevnd eru í miðbýarætlanini eigur kommunan at raðfesta komandi árini, soleiðis at trivnaður og stoltleikin fyri býin verður á einum hægri støði.

Raðfestingarnar fevna um verkætlanir á bæði Large, Medium og Small stigunum.

Large verkætlanir er langtíðar býarmenningin, og eru hesar verkætlanirnar oftani verkætlanir, sum knýta seg í aðrar verkætlanir, framdar á trivnaðar- og tekniska økinum. Verkætlanir á hesum stignum eiga framhaldandi at verða raðfestar, soleiðis at býurin yvirskipað kemur at hanga saman sum ein hægri eind.

Medium verkætlanir eru ítøkiligar verkætlanir, sum snúgva seg um eitt ítøkiligt býarrum ella býarstrekki, og verða tað fyri hvørja býráðsetu raðfestar 3-4 medium verkætlanir.

Small verkætlanir eru smáar verkætlanir og tiltøk, sum eru skjótar at fremja. Hesar verkætlanirnar kunnu bæði vera støðugar verkætlanir og fyribils verkætanir. Í raðfestingunum í miðbýarætlanini hava vit valt ikki at vísa á nakrar av small verkætlanunum, sum vit meta eru sjálvsagdar. Hesar eru millum annað:

- Arkitekturdagarnir: Árliga tiltakið, sum Arkitektafelag Føroya fyriskipar, og kommunan luttekur í.
- Vetrarljós: Árliga tiltakið, sum Visit Tórshavn fyriskipar, og kommunan luttekur í.
- Býarrúmsinnbúgv, so sum ljóssteyrar, benkur, skrellispannir, skelting, plantur o.s.fr., sum fellur innan rakstarøkini á teknisku fyrisiting.

At fremja allar verkætlanirnar í verki hendir bara, verður alt gjørt í góðum samstarvi. Borgarar, íleggjarar og kommunan saman við politisku skipanini mugu arbeiða í felag, og er tað okkara vón við Miðbýarætlanini, at kommunan í framtíðini fer at gera gagn av miðbýarætlanini og teimum raðfestu verkætlanunum, sum miðbýarætlanin stingur út í kortið eiga at verða gjørdar, soleiðis at býurin við tíðini fær ein samlaðan samleika, har nýhugsan og varðveiting ganga hong í hond.



# RAÐFESTING



VERKÆTLANIR Í GONGD
KOMMUNUSKÚLIN
MULLER S PAKKHÚS
PERLUTORGIÐ
MØTISTAÐIÐ (STEINATÚN)
STEINATÚN
SKAL SETAST Í VERK - BÝRÁÐIÐ 2017-2021
STEINATÚN
PARKERINGSHÚSIÐ Á SKÁLATRØÐ
STØRRI ÁTØK - VERKÆTLANIR
SMÆRRI ÁTØK- VERKÆTLANIR
TÓRSGØTA MENTANARKJAK
MIÐBÝARFERÐSLAN UMSKIPAST
"KUBEN"
GRØNA LEIÐIN - FRK. COHR


MIÐSTAÐARGØTA (DR. JAKOBSENSGØTA)
TORGIÐ Í VÁGSBOTNI
KOMMUNUSKÚLAGARÐURIN
- URBANUR ÍTRÓTTUR
ÁARVEGUR - FYRIBILS ÁTAK


SKAL SETAST Í VERK - BÝRÁÐIÐ 2021-2025
KOMMUNUSKÚLATORGIÐ
PARKERINGSHÚS Á KONGABRÚNNI
ÁARVEGURIN - LATA HAVNARÁ UPP
BÝRÁÐSPLÁSSIÐ
FRAMTÍÐAR VERKÆTLANIR
TORGIÐ VIÐ SMS
TINGHÚSTORGIÐ - KÆRLEIKSGØTAN
STØRRI ÁTØK - VERKÆTLANIR
SMÆRRI ÁTØK- VERKÆTLANIR
GRØNA LEIÐIN MILLUM SJÓNLEIKARAHÚSIÐ OG SMS



- GRØNA LEIÐIN VIÐ TINGHÚSVEGIN
- KOMMUNUSKÚLAGARÐURIN/PARKERING
- BÝARRÚMIÐ VIÐ HAVNALAGIÐ Á SKÁLATRØÐ
- VESTARA BRYGGJA
- MIÐSTAÐARGØTA (NIELS F. GØTA) - SMS
- VAGLIÐ (STYRKJA HÁTÍÐARLIGA STREKKIÐ)
- SAMBANDIÐ RUNT HAVNALAGIÐ OG STRANDARLINJUNA

# ORÐASKIFTI

Stigbýti - Býráðið
Umframt at góðkenna avgerðirnar í nevndunum so leypandi, tekur samlaða Býráðið í hvørjum valskeiði støðu til "øjebliksbilledet" og ta raðfestu skrá yvir verkætlanirnar í tíðarskeiðnum.

Stigbýti - Nevndirnar
Tær ymsu nevndirnar verða tiknar við treytað av hvørji átøk skulu fremjast, og hvør verkætlan talan er um. Roknast kann við at byggi- og býarskipanarnevndin fær ein høvuðsleiklut.

Stigbýti - Umboð í miðbýnum
Har ein verkætlan verður sett í gongd, verður eitt "forum" sett. Alt eftir hvør verkætlan talan er um, verða ymisk umboð tikin við til at geva sítt íkast til tær ymsu verkætlanirnar í miðbýnum.

Stigbýti - Innanhýsis fakfólk
Starvsfólkini í kommununi samskipa verkætlanirnar millum stjórarnar og ymsu fyrisitingarnar í mun til menningina av miðbýnum. Starvsfólkini eru tað fremjandi organið.



TÓRSHAVNAR
KOMMUNA